| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 739 |
| | | Forkvinnunnar merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 20. november 2025 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 238/25-261/25

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson fór av fundinum 20:45
Kári Johansen
Høgni Vilhelmsen
Birgir Nielsen

**LUTTÓKU EISINI:**
David Andresen
Eyðfríð Jacobsen
Hermann Mortensen
Mortan Simonsen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Birita í Dali, Øssur Patursson

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 238/25 | 25/00163-1 | Mál beind í nevndir 2025 | 742 |
| 239/25 | 25/09730-1 | Nýggj heilsumiðstøð 2026 | 744 |
| 240/25 | 25/09731-1 | Frontaldemens deild skipast | 748 |
| 241/25 | 25/08905-1 | Umbøn um eykajáttan í sambandi konto 2617 | 751 |
| 242/25 | 25/09624-1 | Vognrúm og garður - Býlingshúsið á Ternuryggi, matr. nr. 1470eo, Tórshavn | 754 |
| 243/25 | 25/09538-1 | Umvæling og útbygging av Kapellinum á matr. nr. 995, Tórshavn - 22/07254 | 756 |
| 244/25 | 25/05791-1 | Umbøn um eykajáttan til kontu 6510 Kirkjugarðar í 2025 | 758 |
| 245/25 | 25/08370-1 | Frítíðarhús í Hesti – matr. nr. 101 og 10a - 22/00328 | 765 |
| 246/25 | 25/08053-3 | Innræsnar plantur | 767 |
| 247/25 | 25/05483-9 | Eigarafeløgini Karlamagnusarbreyt 6 og 8 : Áheitan um skelting millum blokkarnar, so bilar ikki parkera á økinum, sum er ein brandvegur | 771 |
| 248/25 | 25/00252-4 | Útstykking oman fyri Argjahamar - 21/01777 | 773 |
| 249/25 | 25/09309-1 | Pedda við Stein gøta - Gongubreyt og asfaltering | 777 |
| 250/25 | 25/04245-1 | Útskiftan og umvælingar á Brennistøðini í 2025 | 779 |
| 251/25 | 25/09301-1 | Nýggj stýriskipan til Brennistøðina | 782 |
| 252/25 | 25/02161-1 | Trivnaðarøkið við bátahylin í Álakeri | 785 |
| 253/25 | 25/00251-2 | Umsókn um longda tíðarfreist uppá játtaðan stuðul til nýggju kirkju á Argjum | 790 |
| 254/25 | 25/00319-1 | Makaskifti skúlabygningar á Frælsinum og Hoydølum - 22/03066 | 792 |
| 255/25 | 25/09097-1 | Hølisviðurskifti hjá fyrisitingini hjá Tórshavnar kommunu | 798 |
| 256/25 | 25/00394-3 | Fleiri koyritímar til bussleiðina - 24/00552 | 800 |
| 257/25 | 25/10008-1 | Umbøn um eykajáttan av meirinntøkum 2024 - 24/08061 | 801 |
| 258/25 | 25/09786-1 | Eykajáttan av meirinntøkum 2025 | 804 |
| 259/25 | 25/06020-1 | Fíggjarætlan 2026, Tórshavnar kommuna | 808 |
| 260/25 | 25/00161-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025 | 821 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 261/25 | 25/03549-3 | Bústaðarbygging í Norðreki í Kollafirði, matr. nr. 313a - 23/02421 | 824 |

| | Blað nr.: 742 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Forkvinnunnar merki: |

**Til viðgerðar**

# 238/25 Mál beind í nevndir 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.01.2025 | 34/25 | 25/00163-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 49/25 | 25/00163-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 68/25 | 25/00163-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 96/25 | 25/00163-1 |
| 5 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 120/25 | 25/00163-1 |
| 6 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 144/25 | 25/00163-1 |
| 7 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 177/25 | 25/00163-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 217/25 | 25/00163-1 |
| 9 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 238/25 | 25/00163-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 743<br>Forkvinnunnar merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 30. januar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Tikið til eftirtektar.

# 239/25 Nýggj heilsumiðstøð 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 06.11.2025 | 24/25 | 25/09730-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 188/25 | 25/09730-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 239/25 | 25/09730-1 |

**Upprunin til málið**
**Nýggj Heilsumiðstøð 2026 / Nýggjur kommunulækni 2026**

Tórshavnar kommuna hevur seinastu árini upplivað stóran fólkavøkstur, sum hevur økt trýstið á heilsuøkið – serliga kommunulæknaskipania.
Í dag eru 15 kommunulæknaviðtalur í kommuni: 1 í Kollafirði, 5 í Kirkjustræti, 5 í Berjabrekku og 4 í Gundadali. Vanligt er, at 1 lækni hevur uml. 1.600 borgarar tilknýttar, men hóast hetta eru framvegis umleið 800 borgarar í Tórshavnar kommunu uttan fast læknatilknýti.
Heilsutrygd hevur boðað frá, at játtan er á fíggjarlógini til ein nýggjan kommunulækna, sum skal staðsetast í Tórshavnar kommunu á heysti 2026. Samstudis er boðað frá, at um kommunan ikki kann veita viðtaluhøli, verður læknin staðsettur í aðrari kommunu.
Kommunan hevur tí ein bráfagis tørv á at útvega nýggj og tíðarhóskandi hølir, sum kunnu nøkta tørvin hjá nýggjum kommunulæknum og tryggja karmar fyri víðari menning av heilsutænastum í kommununi.
Tørvurin verður enn størri við vaksandi fólkavøkstri, hækkandi miðallivialdri, og vaksandi tali av eldri borgarum og fólki við varandi sjúkum. Hetta merkir, at tørvurin á fleiri kommunulæknum fer at økjast í komandi árum.
Heilsumálaráðið hevur harumframt givið tekin um, at helst verður játtan til fleiri kommunulæknar longu í 2027.

<u>Lógir, ásetingar o.a.:</u>
*Løgtingslóg nr. 66/2025 um heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá borgaranum*
Við løgtingslóg nr. 66/2025 varð føroyska heilsuskipanin endurskipað við tí endamáli at flyta tænastunar nær borgaranum og tryggja, at fyribyrging, viðgerð og ráðgeving verða veitt í einum sameindum og tvørfakligum ramma.
Sambært § 1 og § 3, stk. 1 skal landið býtast í heilsuøkir, og í hvørjum øki skulu skipast ein ella fleiri heilsumiðstøðir, har borgarar kunnu fáa heilsutænastur í sínum nærumhvørvi.
Hetta merkir, at fleiri heilsufakbólkar – eitt nú kommunulæknar, sjúkrarøktarfrøðingar, ljósmøður og onnur heilsufakfólk, skulu virka saman í felags karmum, har dentur verður lagdur á fyribyrging, samanhangandi viðgerð og dygd.
Kommunurnar hava sambært §§ 4-7 skyldu til at útvega hóskandi hølir til hesar miðstøðir, og at leggja fram uppskot fyri landstýrisfólkið um bygging, útbygging ella leigu av hølum.
<u>Tørvslýsning</u>
Tørvurin á nýggjum hølum til kommunulæknar er bæði akuttur og lógarbundin. Tórshavnar kommuna skal tryggja, at karmar eru til taks, sum kunnu nøkta tann vaksandi tørvin, ið stendst av fólkavøkstri, hækkandi miðallivialdri og vaksandi tali av borgarum við varandi sjúkum.
Í dag eigur Tórshavnar Kommuna læknaviðtalur í Gundadali og Kollafirði, meðan viðtalurnar í Berjabrekku og Hoyvík eru leigumál.
Verandi hølir hava ikki rúmd til fleiri læknaviðtalur, og tí er tørvur á at finna eina loysn, sum bæði nøkta bráðfeingis tørvin og tryggjar karmar fyri komandi ár.
Heilsu- og umsorganarfyrisitingin hevur arbeitt við teimum møguleikum:

1. **Loysn A:** Byggja nýggja heilsumiðstøð sum kann hýsa fleiri kommunulæknaviðtalum og øðrum heilsutænastum sambært lóg.

2. **Loysn B:** Útbygging av læknaviðtaluøkinum í Kirkjustræti í Hoyvík við uml. 500- 600 m2, sum eigarin Sp/f K2 hevur víst áhuga at fremja, og sum kommunan kann fáa forkeypsrætt til.

Báðir møguleikar tryggja, at kommunan kann hýsa nýggjum kommunulæknum og leggja lunnar undir víðari menning av heilsutænastum til heilsumiðstøðir.

<u>**Loysn A** – nýbygging av heilsumiðstøð</u>
Ein nýggj heilsumiðstøð kundi hýst kommunulæknaviðtalum, fyribyrgjandi heilsutilboðum og øðrum grundleggjandi heilsutænastum sambært lógini.
Kommunan kann velja staðseting sum er met hóskandi til virksemi
Fyrimunir:

- Varandi karmar til heilsutænastur og møguleika fyri samanhangandi arbeiði millum fakbólkar.
- Kommunan eigur bygningin og fær ræði á nýtslu og framtíðar tillagingum.

Vansar:

- Krevur longri fyrireiking og stórar fíggjarligar íløgur
- Loysnin kann ikki fremjast innan 2026, og kevur tí fyribilsloysn til nýggja læknan.

<u>**Loysn B** – útbygging av læknaviðtalu á Kirkjustræti í Hoyvík</u>
Útbyggingin í Kirkjustræti umfatar umleið 600 m2 afturat verandi læknaviðtalum, og kann geva pláss til tvær nýggjar kommunulæknaviðtalur.
Hetta ger tað møguligt at taka ímóti nýggjum lækna í 2026 og einum afturat í 2027 sum helst verður neyðugt.
Fyrimunir:

- Kann fremjast skjótari og loysa bráðfeingistørvin
- Krevur minni íløgu enn nýbygging
- Kommunan fær møguleika at keypa seg inn og tryggjar framtíðar nýtslu
- Á sigt kann útbyggingin mennast til eina heilsumiðstøð, har fleiri fakbólkar kunnu virka saman í samsvari við nýggju skipanina.

Vansar:

- Avmarkaður útbyggingarmøguleiki á staðnum
- Verandi loysn sum skal tillagast virksemini í framtíðini

<u>Meting</u>
Báðir møguleikar eru í tráð við løgtingslóg nr. 66/2025, og stuðla undir endamálið um at flyta heilsutænastur nær borgarnum.
Fyrisitingin metir, at útbyggingin í Kirkjustræti gevur bestu og mest tíðarhóskandi loysnina fyri tørvin nú, samstundis sum nýbygging kann takast við í víðari heildarætlan.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin á heilsu- og umsorganardeildini mæla heilsu- og eldranevndini til at taka undir við

- At heimila umsitingini at fara undir samráðingar við eigaran av læknaviðtalunum í Kirkjustræti um útbygging av bygninginum og um leigumál av hesum. (loysn B)
- At umsitingin fer undir at gera eina heildarætlan fyri heilsumiðstøðir í kommununi sambært lóg
- At leggja málið fyri Býráðið umvegis Fíggjarnevndina til endaliga støðutakan.

**Heilsu- og eldranevndin 06. november 2025:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen og Annita á Fríðriksmørk, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum, og heitir á umsitingina um at kanna hvørjir møguleikar eru, at húsa tveimum kommunulæknum á Argjum.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Heðin Mortensen, tekur undir við meirilutanum í heilsu- og eldranevndini og at beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við punkt 2 í tilmælinum, um at umsitingin fer undir at gera eina heildarætlan fyri heilsumiðstøðir í kommununi sambært lóg, og at heilsumiðstøðir verða staðsettar á Argjum/vesturbýnum.

| | Býráðsfundur<br>20. november 2025 | Blað nr.: 747<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Annfinn Brekkstein legði fram broytingaruppskot um at kanna møguleikar fyri at staðseta heilsumiðstøð á Argjum/Vesturbýnum.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, har fimm atkvøddu ímóti, fýra atkvøddu fyri og trý atkvøddu blankt.

Ímóti atkvøddu: : Elsa Berg, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, og Guttormur í Skála.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Kári Johansen. Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Bergur Robert Dam.

Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 4 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Birgir Nielsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

# 240/25 Frontaldemens deild skipast

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 06.11.2025 | 25/25 | 25/09731-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 189/25 | 25/09731-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 240/25 | 25/09731-1 |

**Upprunin til málið**
Skipa serliga deild til borgarar við Frontotemporal demens (FTD) ella frontallap-demens atburði.

**Lýsing av málinum**
Neyðugt er at skipan eina eind, sum er málrættað fólki, ið hava Frontotemporal demens[1] (FTD) og ikki megna, at búgva saman við og umgangast onnur búfólk.

Tað eru í dag 13 búfólk, sum búgva á ellis- og røktarheimunum/sambýlunum í Heilsu- og umsorganar-tænastuni, sum hava fingið staðfest FTD, ella hava ein frontallap-demens atburð.

Av hesum 13, eru tað 5 búfólk, sum hava serligan tørv á kørmum/umhvørvi og førleikum og hava so týðandi órógvaðan atburð, at tað ikki er møguligt, at veita nøktandi umstøður á verandi demensdeildum.

Fyri at tryggja nøktandi umstøður til fólk við FTD ella FTD- atburði, sum í so ógvusligt mát eru ávirkað í sínum atburði, at tey ikki megna at fyrihalda seg til og vera saman við øðrum, er neyðugt at skipað umstøður og karmar, ið taka atlit til serliga tørvin hjá hesum málbólki.

Títtleikin av FTD, tað eru millum 2-3% av øllum, sum verða rakt av demensi, sum fáa frontotemporal demens.

At hava henda málbólkin saman við øðrum borgarum við demessjúkum er ikki bert órógvandi fyri tey sum eru rakt av FTD men eisini fyri tey sum búgva saman við teimum. Leiðarar og starvsfólk á deildum har borgarar við demenssjúkum búgva hava leingi gjørt vart við trupulleikarnar sum standast av at fólk við FTD búgva saman við fólki við øðrum demenssjúkum.

At skipa røttu karmarnar fyri borgarar við FTD, gevur báðum málbókum betri karmar og viðgerðin og røktin av báðum málbólkum kann skipast skynsamari og vera til størri gang fyri borgaran. Somuleiðis fer hetta at bøta um trygdina og arbeiðsumstøðurnar á øllum demensdeildum.

Á Boðalon er møguleiki at skipa slíka eind. Har eru 4 búpláss á einari deild við 16 plássum sum kunnu skildrast frá, soleiðis at deildin verður býtt upp í 4 og 12 búpláss.

Eitt pláss á FTD deild merkir ikki at borgarin nýtist at vera á deildini alla sína tíð á røktarheimið. Sum sjúkan útviklar seg og frotallap-demesatburðurin broytist kann borgarin flyta á vanliga deild fyri borgarar við demenssjúkum.

Tað krevur hægri normering at vera um borgarar við FTD. Til ber ikki at vera einsamallur á vaktini so hóast talan bert eru um 4 búpláss krevur tað tó at tvey starvsfólk eru til staðar í dag og kvøldvaktini, umframt eina náttarvakt. Ein náttarvakt er til tey 12 plássini sum eru tengd at deildini við 4 borgarum og tí kunnu náttarvaktirnar hjálpast at.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 749 |
| | Forkvinnunnar merki: |

Í hesum føri merkir tað eina uppraðfesting av einari dagvakt, einari kvøldvakt og einari náttarvakt í øllum vaktum. Tað svarar til eina uppraðfesting á 4,5 ársverk sum er á leið 3.6 mio. kr. Tó verður ikki mett at tilboðið kann fara í gongd 1. Januar og tí krevst lægri fígging í 2026. Metta fíggjarorkan komandi ár er 2.6 mio. kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

Heilsu- og umsorganarstjórin og eindarleiðarin í heilsu- og umsorganartænastuni mæla heilsu og eldranevndini at taka undir við at skipa verður ein deild til fólk við FTD ella FTD atburði, og at uppraðfesta øki á FÆ 26 við 2.6 mio. kr. og at fíggingin verður av afturberingini til eldraøkið.

At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina

**Heilsu- og eldranevndin 06. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá heilsu- og eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 751 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 241/25 Umbøn um eykajáttan í sambandi konto 2617

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 02.10.2025 | 58/25 | 25/08905-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 08.10.2025 | 168/25 | 25/08905-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 221/25 | 25/08905-1 |
| 4 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 241/25 | 25/08905-1 |

**Upprunin til málið**
Talan er um framflytingar av hallið í 2023 og 2024 á konto 2617 - Brúkaragjøld, serstovnar.

**Lýsing av málinum**
Tá børn verða umsorganaryvirtikin sambært lóg um barnavernd, so verða tey sett heiman í fosturfamilju (2613) ella innskrivaði á Barnaverndarstovn undir Almannaverkið. Eitt stovnspláss á Barnaverndarstovni kostar á leið 32.000 kr. pr. mðr. pr. barn. Hendan upphæddin verður bókað av konto 2617.

Tá fíggjarætlanin verður løgd fyri konto 2617, so ger man eina meting útfrá verandi støðu, har hugt verður eftir hvørji børn / ung eru innskrivaði, hvørji væntandi verða útskrivaði, og hvørji møguliga kunnu væntast verða innskrivaði.

Í 2022 lækkar man játtanina við 1,3 mió, tí barnatalið á stovni lækkar. Í 2023 og í 2024 hækkar barnatalið, men játtanin verður ikki reguleråð tilsvarandi. Hetta merkir at eitt hall á 568.000kr í 2023 og eitt hall á 1.158.000kr í 2024 gevur eitt samlað hall á 1.726.000kr, sum verður framflutt í 2025.

Um hugt verður eftir konto 2617 uttan framflyting, so væntast at játtanin fyri konto 2617 heldur við einum yvirskotið á ca. 500.000kr.

Tørvur er á at fáa hallið burtur, tí upphæddin er so mikið høg, at tað er trupult og nærum ómøguligt at spara innaftur, tí fyriskipanin er lógarbundin. Tvs. um mett verður, at eitt barn hevur tørv á stovnsplássið, so skal tilmælið leggjast fyri Føroya Kærustovn.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 752<br><br>Forkvinnunnar merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| | | Meir inntøkum 2025 | 2617 | | Brúkaragjøld, serstovnar | | 1.200.000kr |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á Sosialu deild mæla Trivnaðarnevndini til taka undir við tilmælinum, um eykajáttan á 1.2 mió á konto 2617 "Brúkaragjøld, serstovnar" av meir-inntøkunum fyri 2024, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 02. oktober 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. oktober 2025:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Einmælt samtykt.

## 242/25 Vognrúm og garður - Býlingshúsið á Ternuryggi, matr. nr. 1470eo, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 05.11.2025 | 122/25 | 25/09624-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 187/25 | 25/09624-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 242/25 | 25/09624-1 |

**Upprunin til málið**
Málið er lýst í jnr. 22/05165-2, Vognrúm og garður – Býlingshúsið á Ternuryggi

**Ískoyti**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevnd og býráð til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað og møguligt avlop ella hall fellur aftur til íløgukarmin.

Arbeiðið við verkætlanini at útbyggja vognrúm til dagstovnin er liðugt og virksemið á stovninum flutti inn aftur um árskiftið 2024/2025. Meðan útbyggingin fór fram, og stovnurin varð fluttur í onnur høli i Hoydøum, vórðu eisini aðrar størri umvælingar gjørdar á stovninum, eitt nú at skifta tekju, málaraarbeiði, gólv vórðu skift ventilatión varð løgd inn. Hetta sum rakstaruppgávur..

Nakað av óvæntaðum útreiðslum vóru, so sum at betra um marknaðarviðurskiftini við granna suðureftir.

Nú verkætlanin er L31019 skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt lítið hall á kr. 3.000.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið

**Mentamálanevndin 05. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Einmælt samtykt.

## 243/25 Umvæling og útbygging av Kapellinum á matr. nr. 995, Tórshavn - 22/07254

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.11.2025 | 162/25 | 25/09538-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 194/25 | 25/09538-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 243/25 | 25/09538-1 |

**Upprunin til málið**
Málið er lýst í jnr. 22/07265-2, Umvæling og útbygging av Kapellinum á matr. nr. 995, Tórshavn, sum er lagt við sum fylgiskjal.

**Ískoyti**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Arbeiðið við verkætlanini at umvæla Kapellið hevur gingið nøktandi. Trupulleikar vóru við lekum og misliting, og at eldri puss og máling skallaði av inniveggum.

Farið varð eftirfylgjandi undir umfatandi renoveringsarbeiði av útveggum. Rivur eru nú tettaðar, útveggir eru styrktir, og alt høvuðsrúmið er pussað av nýggjum og málað. Eisini eru vindeygu og høvuðshurð skift. Renoveringsarbeiðið hevur allatíð havt fyri eyga ikki at skala upprunabygningin og sniðið á honum.

Á sumri í 2024 er málið um eykajáttan til rakstur á kirkjugørðum fyri. Samtykt verður tá við tvær viðgerðir at játta kr. 1,7 mió av løgukontu L65006, Kapellið, umvæling og útbygging, til rakstrarkontu 6510, Kirkjugarðar.

Talan var eisini um møguliga at víðka Kapellið, men hetta varð seinni slept.

Nú verkætlanin L65006, "Umvæling og útbygging av Kapellinum", skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt avlop á kr. 19.000, sum verða fluttar aftur á løgukarm LK65999 Kirkjugarðar (íløgur).

**Skjøl**
22/07254-2 Umvæling og útbygging av Kapellinum á matr. nr. 995, Tórshavn
25/09538-2 Umbøn um eykajáttan til kontu 6510, samtykt

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at verkætlanin L65006 "Umvæling og útbygging av Kapellinum" verður lokað, at avlopið á kr. 19.000 verða fluttar aftur á løgukarm LK65999, Kirkjugarðar (íløgur), og at málið verður beint um fíggjarnevndina í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Einmælt samtykt.

# 244/25 Umbøn um eykajáttan til kontu 6510 Kirkjugarðar í 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2025 | 105/25 | 25/05791-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 107/25 | 25/05791-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 154/25 | 25/05791-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 188/25 | 25/05791-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.11.2025 | 154/25 | 25/05791-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 190/25 | 25/05791-1 |
| 7 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 244/25 | 25/05791-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | | 25/05791-1 |

**Upprunin til málið**
Rakstrarjáttanin kt. 6510, kirkjugarðar, hevur verið undir stórum fíggjarligum trýsti seinastu árini.

Yvirskipað eru fleiri grundir til fíggjarliga trýstið, og niðanfyri síggjast nakrar av orsøkunum:

- Størri krav til røktina á kirkjugørðunum
- Slátturin av grasinum verður í størri mun boðin út. Síðani 2020 er allur sláttur boðin út.
- Fleiri og størri kirkjugarðar at røkja.
- Fleiri jarðarferðir
- Lønarviðurskiftini
- Leiga av amboðum

Ynski er at fáa standin og raksturin á kirkjugørðunum at verða raðfestan, soleiðis at kirkjugarðarnir í kommununi verða røktaðir við tí tign og virðing, sum verður kravt av teimum.

**Lýsing av málinum**
Í 2024 varð játtanin hækkað við kr. 1.700.000, sí mál nr. *24/01618-1, Umbøn um eykajáttan til konto 6510*, umframt at kr. 900.000 vórðu játtaðar sum eykajáttan til kt. 6510. Í 2023 hevði kontan eitt hall á kr. 380.000, sum hendan eykajáttanin somuleiðis mátti dekka.

Í máli nr. 24/01618 varð somuleiðis samtykt, at umsitingin skuldi venda aftur í nevnd við einum uppskoti um, hvussu raksturin í kirkjugørðunum í kommununi kann verða skipaður í framtíðini.
Hetta varð ongantíð gjørt, og nú eru kirkjugarðarnir komnir aftur undir býararkitektin og Býarskipanardeildina. Í hesum sambandi hava býararkitekturin og leiðarin á Kirkjugørðunum gjøgnumgingið virksemið og játtanina fyri fíggjarárið 2025.

Lønarviðurskifti
Lønarviðurskiftini eru í einari fastari og støðugari legu og kemur lønarjáttanin fyri 2025 tískil væntandi at halda

Dagføringar av amboðum og rakstrargøgnum:

- Amboðini á kirkjugørðunum verða í høvuðsheitum leigaði frá Verkstaðnum. Onkur eldri amboð eru tó uttanfyri hesa leiguskipan, og verða nú tí tørvur er at skifta tey út, koyrd undir somu leiguskipan. Hetta gevur hægri útreiðslur til leigu, men framtíðar útreiðslurnar til viðlíkahald koma at lækka.
- Ítøkiliga fevnir hendan útskiftingin um stóru og lítlu gummigedina og ein arbeiðsbil.
- Samanlagt kosta hesar dagføringarnar fyri árið 2025 kr. 253.660 afturat í leigukostnaði.

Grundrakstur:

- Harumframt verður játtanin brúkt til keyp av vørum og tænastum til at fremja grundleggjandi rakstrarlig arbeiðið á kirkjugørðunum, sum t.d. fevnir um:

- Olju-nýtsla
- El-nýtsla
- Keyp av vørum (klæðir, nummarpelar til gravir, formar til gravir osfr.)

- Samanlagt kemur hesin parturin av játtanini at kosta uml. kr. 666.000, harav játtanin til hendan partin liggur á kr. 1.090.000, sostatt eru einans uml. kr. 424.000 eftir til uttanhýsis røktina.

Grøna røktin/slátturin á kirkjugørðunum:

- Býarskipanardeildin bjóðaði fyrr í vár grønu røktina út á kirkjugørðunum. Uttanhýsis veitararnir hava latið tilboð inn, og liggur røktin samanlagt á áljóðandi kr. 2.729.864 pr. ár.
- Av tí at partur av árinum 2025 er farið, so krevst einans fígging til ein part av hesum tilboðunum áljóðandi kr. 1.999.076.
- Røktin fevnir um sláttur á teimum 13 kirkjugørðunum í kommununi, umframt røkt av runnum.
- Í 2024 kostaði uttanhýsis røktin kr. 1.231.500, harav kr. 162.500 ikki vórðu goldnar í fíggjarárinum 2024, men eru goldnar í ár 2025.
- Tøka játtanin til hetta arbeiðið er kr. 424.000 *(sí omanfyri standandi punkt “Grundrakstur”)*, og sostatt mangla kr. 1.575.000, fyri at játtanin skal halda.

Játtanin fíggjarárið 2025 til kt. 6510, kirkjugarðar, er áljóðandi **kr. 6.005.000**.

Út frá kendu útreiðslunum, lýstar omanfyri, umframt eini meting av hvat raksturin fyri økið annars kemur at verða í 2025, so er støðan tann, at játtanin má hækkast við tilsamans **kr. 1.895.221** fíggjarárið 2025. Sí skjal *j.nr. 25/05791-2, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2025*, sum lýsir útreiðslurnar.

Ítøkilig fevnir hendan økingin um:

- Øktur leigukostnaður í samb. við átroðkandi útskifting av amboðum á áleið kr. 253.660.
- Tørvur til uttanhýsis røktina á kr. 1.575.000 hægri enn verandi játtan rúmar.

Partur av hesi upphæddini, kr. 1.183.000, kann fíggjast av *kt. 6575, L65008 Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum*. Fyri íløguna, *L65008 Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum*, merkir hetta, at arbeiðið at seta gróðursetingar- og innbúgvsætlanina í verk ikki verður raðfest í 2025, eins og *mál nr. 25/04098, Uppraðfesting gøtur í Kirkjugørðunum*, lýsir.

Restin av teimum 1.895.221 kr, sum kirkjugørðunum tørvar í 2025, svarandi til 787.779 kr, verður mælt til at játta av meirinntøkunum fyri 2025, ella í øðrum lagi at støða verður tikin til hetta seinni í heyst.

**Lógir, ásetingar o.a.**

-

**Upplýsingar frá umsitingini**

Dagligi raksturin av kirkjugørðunum í Tórshavnar Kommunu fevnir um tilsamans 13 kirkjugarðar, har kirkjugarðurin við Velbastaðvegin, sum er nógv víðkaður og útbygdur hesi seinastu árini, er nógv tann størsti kirkjugarðurin í kommununi.

Hinir kirkjugarðarnir liggja spjaddir í ymsu bygdunum, ið eru komnar upp í Tórshavnar Kommunu gjøgnum árini. Eisini er onkur nýggjur kirkjugarður komin afturat, t.d. nýggi kirkjugarðurin í Hoyvík.

Í kjalarvørrinum av hesi gongdini er umsitingin, røktin og viðlíkahaldið av kirkjugørðunum vorðin rættiliga umfatandi, men játtanin til konto 6510, Kirkjugarðar, hevur ongantíð verið dagførd samsvarandi hesi gongdini, og tískil er neyðugt at virða, at ásetta játtanin ikki røkkur til veruliga raksturin og neyðuga viðlíkahaldið.

Seinastu nógvu árini hevur konta 6510, Kirkjugarðar, havt árligt hall/meirnýtslu. Niðanfyri sæst yvirlit yvir meirnýtsluna á kontuni síðani 2015.

| Býráðsfundur<br>20. november 2025 | Blað nr.: 760<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|

| Kirkjugarðar | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Játtan | 2.917 | 3.270 | 3.397 | 4.395 | 4.569 | 4.616 | 4.698 | 4.082 | 6.005 |
| Hækkan í % | 2% | 12% | 4% | 29% | 4% | 1% | 2% | -13% | 47% |
| Framflutt | -707 | -1.266 | -172 | -74 | -296 | -744 | -2.520 | -380 | -102 |
| Broytt framflyting frá ymiskum kontum | | 1.229 | | 100 | 300 | | | 900 | |
| Eyka játtan | | | 172 | | | | 3.500 | 1.700 | |
| Játtan í alt | 2.210 | 3.233 | 3.397 | 4.421 | 4.573 | 3.872 | 5.678 | 6.302 | 5.903 |
| Nýtsla | 3.476 | 3.405 | 3.471 | 4.717 | 5.317 | 6.392 | 6.058 | 6.404 | |
| Avlop/Meirnýtsla | -1.266 | -172 | -74 | -296 | -744 | -2.520 | -380 | -102 | |

Mælt verður til, at hædd verður tikin fyri hesi gongdini í sambandi við gerð av Fíggjarætlanini 2026, og at játtanin verður stillað samsvarandi ítøkiligu metingunum fyri rakstrarjáttanina.

Leiðarin av kirkjugørðunum og býararkitekturin hava gjørt eina meting av árliga kostnaðinum at reka kirkjugarðarnar í kommununi, soleiðis at kirkjugarðarnir frameftir verða riknir við tí tign og virði, ið hoyrir til henda raksturin. Metingin tekur støði í búskettinum fyri 2024-25 og sæst í viðhefta skjali, *j.nr. 25/05791-3, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2026*.

Búskettið fyri raksturin er sett upp við støði í kostnaðum frá 2024-25, og er lønin sett at vera tann sama í komandi ári, hóast lønarútreiðslurnar helst hækka nakað samsvarandi árligu stillingunum.

So statt eigur framroknaða játtanin 2026 í skjali, *j.nr. 25/05791-3, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2026,* at taka hædd fyri møguligum prísvøkstri, umframt natúrliga lønarvøkstrinum í samb. við ger av fíggjarætlanini 2026.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
jnr. 24/01618, Umbøn um eykajáttan til konto 6510
jnr. 25/04098, Uppraðfesting gøtur í Kirkjugørðunum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Verkstaðið vísir á, at verandi amboð/maskinur, sum ikki eru í leiguskipanini, eru í so mikið ringum standi, at tørvur er at skifta tey út, longu í 2025.

**Skjøl**
*24/01618-1, Umbøn um eykajáttan til konto 6510*
*25/05791-2, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2025*
*25/05791-3, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2026*

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6575 | L65008 | Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum | 6510 | | Kirkjugarðar | | 1.183.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1.183.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 1.183.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á Kirkjugørðunum mæla til:

- at játta kr. 1.183.000 av kt. 6575, L65008, Gøtur, gróðurseting og innbúgv í kirkjugørðunum, sum eykajáttan á rakstrarjáttan kt. 6510, Kirkjugarðar,
- at játtan til írestandi kr. 787.779 verður tikin til viðgerðar seinni í heyst.
- og at beina málið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Atkvøtt var fyrst um at beina málið aftur í fíggjarnevndina eftir uppskoti frá Annfinni Brekkstein.

Fyri at beina málið aftur í nevnd atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála.

Uppskotið um at beina málið aftur í nevnd varð felt við 8 atkvøðum ímóti, 5 atkvøðum fyri og ongari blankari.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Fyri at taka undir við tilmælinum atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann.

Samtykt varð við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari at taka undir við tilmælinum og beina málið víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Tróndur Sigurðsson skeyt upp sum broytingaruppskot, at býráðið skuldi hava eina frágreiðing fíggjarstøðuna og reglusemi, áðrenn eykajáttan verður latin jakstrarstaðnum.

Atkvøtt varð fyrst um broytingaruppskotið:

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála

Blankt atkvøddi: Ongin

Broytingaruppskotið fall við 5 atkvøðum fyri, 8 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið:
Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen

Blankt atkvøddi: Ongin

Samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari.

**Ískoyti:**
Upprunin til málið er, at raksturin á kirkjugørðunum hongur ikki saman í mun til játtanina fyri 2025. Víst verður til skjal nr. *25/05791-2, Konta 6510, Meting av rakstrarligu útreiðslunum 2025.*

Árið er meiri enn hálvrunnið, og eru ongar broytingar í væntaðu útreiðslunum. Fram til dags dato hava tað verið 109 jarðarferðir í kommununi. Hetta er áleið tað sama, sum fyri 2024, og tískil kann væntast at tað verður áleið sama tal av jarðarferðum samanlagt í 2025 sum í 2024.

Í dag starvast 3 arbeiðsmenn á kirkjugarðinum í føstum mánaðarløntum starvi, umframt leiðarin fyri kirkjugarðarnar. Harumframt eru tað 2½ arbeiðsmenn í tímaløntum starvi.

Røktin, sum fevnir um grassláttur og viðlíkahald av runnum osfr., í teimum 13 kirkjugørðunum er øll boðin út til privatu vinnuna, og liggur røktin fyri allar kirkjugarðarnar í 2025 á kr. 2.700.000.

Fyrr var røktin gjørd av arbeiðsmonnunum í kirkjugarðinum, men síðani fólkatalið er økt, og harvið eisini talið av jarðarferðum, hava arbeiðsmenninir ikki havt stundir til somuleiðis at taka sær av røktini. Tískil verður røktin boðin út til privatu vinnuna.

Ein møguleiki er sjálvandi at seta fólk í starv at taka sær av røktini í kirkjugørðunum. Upphæddin á kr 2.700.000 hevði upplagt verið til at fíggja eini 5 starvsfólk umframt til keyp av plantum og innbúgvi til kirkjugarðarnar.

Á seinasta býráðsfundi vórðu kr. 1.183.000 játtaðar afturat rakstrarjáttanini á kr. 6.006.000. Restin av teimum 1.895.221 kr, sum kirkjugørðunum tørvar í 2025, svarandi til 787.779 kr, skal tí fíggjast, um játtanin ikki skal fara í trot, tá árið er liðugt.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |

| |
|---|
| **Upphædd** |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 763<br><br>Forkvinnunnar merki: |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6275 | LK62999 | Fríðkan av býnum | 6510 | | Kirkjugarðar | | 787.779 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 787.779 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 1.895.221+6.006.000 |

**Tilmæli**

Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á Kirkjugørðunum mæla til:

- at játta kr. 787.779 av kt. 6275, LK62999, Fríðkan av býnum, sum eykajáttan á rakstrarjáttan kt. 6510, Kirkjugarðar.
  og at beina málið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. november 2025:** Ein minniluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til viðkomandi viðgerð á býráðsfundi um at ein næri frágreiðing skal fyriliggja, áðrenn støða kann verða tikin til málið.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Heðin Mortensen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið til tvær viðgerðir í býráðnum, eisini verður heitt á umsitingina um at koma frágreiðing áðrenn býráðsfundin og uppskotið um, hvussu raksturin av kirkjugørðum í kommununi kann verða skipaður í framtíðini til næsta fíggjarnevndarfund.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Tróndur Sigurðsson legði fram broytingaruppskot um at fáa óheftan løgfrøðing at kanna um nakað skeift er farið fram.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og eini blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein og Bergur Robert Dam Jensen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: Heðin Mortensen

Síðani varð atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 765 |
| | | Forkvinnunnar merki: |

# 245/25 Frítíðarhús í Hesti – matr. nr. 101 og 10a - 22/00328

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Hest/Koltursnevndin | 24.09.2025 | 2/25 | 25/08370-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.11.2025 | 161/25 | 25/08370-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 245/25 | 25/08370-1 |

**Upprunin til málið**
Sí uppruna málslýsing fyri mál nr. 22/00328, j.nr. 25/08370-2, *Uppruna málslýsing_Frítíðarhús í Hesti - matr. nr. 101 og 10a_22_00328*.

**Lýsing av málinum**
Økini matr. nr. 101 og 10a, Hestur vórðu bæði boðin út til bygging av frítíðarhúsum. Tá freistin var farin 16. januar 2023, vóru eingi tilboð innkomin.

Málið varð lagt fyri avvarðandi nevndir aftur á heysti 2023, tá varð samtykt:
- At bjóða norðara økið út í smærri grundstykkjum
- At bjóða økið á havnaøkinum út eina ferð afturat eftir sama leisti sum áður
- At økini verða bjóðað út sum vetrarhús (og ikki einans sum summarhús)

Býarskipanardeildin metti nakað eftir samtyktina á heysti 2023 saman við avvarðandi stjóra, at bíða við at bjóða økið út, grundað á aðrar útbjóðingar um sama tíðarskeið. Tað vísti seg vera nakað trupult at fáa íleggjarar at bjóða, og tí varð hendan samtyktin ongantíð framd.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn galdandi.
Almenna byggisamtyktin fyri Hest

**Upplýsingar frá umsitingini**
Grundað á manglandi tilfeingi á deildini, so verður mett, at ein útbjóðing av økjunum kann fremjast seinni í vetur ella fyrst í komandi ár.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/00328, Fríðtíðarhús í Hesti – matr. nr. 101 og 10a

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
- Málið hevur í núverandi støðu ikki verið til viðmerkingar hjá øðrum deildum.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐**

**Skjøl**
j.nr. 25/08370-2, *Uppruna málslýsing_Frítíðarhús í Hesti - matr. nr. 101 og 10a_22_00328*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at staðbundna nevndin umrøður málið við tí endamálið at meta um hvørt tað er ráðiligt at bjóða økini út til frítíðarhús av nýggjum.

**Hest/Koltursnevndin 24. september 2025:** Staðbundna nevndin metir at tað er ráðiligt at tað verður bjóðað út av nýggjum. Ráðiligt er eisini at gjørt ein bíðilista, kanna um tað kann verða heilárshús, og tillaga útbjóðingarháttin.

**Ískoyti:**
Víst verður til ískoytið omanfyri og samtyktina í staðbundnu nevndini, sum metir, at tað er ráðiligt, at tað verður bjóðað út av nýggjum. Somuleiðis sigur samtyktin, at tað er ráðiligt at gjørt ein bíðilista, kanna um tað kann verða heilárshús, og tillaga útbjóðingarháttin.

Umsitingin kann fara undir at bjóða økini út av nýggjum, men mælir til at Byggi- og býarskipanarnevndin umrøður málið við atliti at samtyktini í staðbundnu nevndini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til:
- At bjóða økið við Kvíggjarveg *matr. nr. 101* út í smærri grundstykkjum
- At bjóða økið á havnarøkinum *matr. nr. 10a* út eina ferð afturat eftir sama leisti sum áður
- At økini verða bjóðað út sum vetrarhús (og ikki einans sum summarhús)
  At málið verður beint í býráðið

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Einmælt samtykt.

## 246/25 Innræsnar plantur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.11.2025 | 159/25 | 25/08053-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 197/25 | 25/08053-3 |
| 3 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 246/25 | 25/08053-3 |

**Upprunin til málið**

Hetta málið er framhald av mál nr. 24/08416, *Garðaskøra – Alchemilla mollis,* sí viðhefta skjal j.nr. 25/08053-5, *Uppruna málslýsing mál nr. 24_08416 Garðaskøra – Alchemilla mollis*.

Seinastu árini er tað lagt eitt størri trýst á kommununa, um at taka støðuna í meira álvara, tá talan er um innræsnar plantur. Eisini tá talan er um Garðaskøruna *Alchemilla mollis.* Kommunan hevur fingið fleiri fráboðanar frá borgarum gjøgnum prei-skipanina DriftWeb, eisini er Garðaskøran blivin staðfest úti á Nólsoy.

Á heystið 2024 varð mál 24/08416 viðgjørt í náttúru- og umhvørvisnevndini, har tað bleiv samtykt eftir tilmæli frá tekniska stjóra og leiðaranum á umhvørvisdeildini:

- at tiltøkini, sum higartil eru gjørd av kommununi, verða eftirmett saman við býargartnaranum.
- at kommunan skundar undir landsmyndugleikarnar, at koma við lóggávu, ið forðar fyri, at óynsktar plantur koma til landið.

Náttúru- og umhvørvisnevndini samtykti 29. oktober 2024 at taka undir við tilmælinum, og at umsitingin ger ætlan fyri komandi ár viðvíkjandi skøru og øðrum innræsnum plantum.

**Lýsing av málinum**

Umsitingin hevur havt samskifti við Umhvørvisstovuna, um at fáa kunningartilfar, ið lýsir heilt greitt, hvat ein innræsin planta er, og hvussu kommunan og borgarar fáa bast teimum. Hetta tilfarið verður klárt eftir heystferiuna. Leggjast skal afturat, at ein kunningarfilmur verður framleiddur, saman við Umhvørvisstovuni, FNU og býargartnaranum.

Umhvørvisstovan og FNU hava staðiliga heitt á kommununa um ikki at koyra ábyrgdina á borgaran, eisini skal kommunan vera ein frontfigurur fyri at basa innræsnum plantum á kommunalum økjum.

Býargartnarin hevur síðani mælt til, at kommunan skal taka henda trupulleikan í álvara, og tí verður mælt til, at ein meira skipað tilgongd verður sett í verk fyri ávís útvald økir. Útvaldu økini eru:

- Fríøkið millum Tórsbyrgi og Lágargarð matr nr. 674a
    - Garðaskøra, sponsk hindber, mammutblad ‘*Gunnera manicata’*, fuksia ‘*fuchsia magellanica*’ og sigursskúvur *‘Epilopium angustifolium*’
- Ellisheimi á Vallalíð *matr nr. 881f* og spæliplássið *matr nr. 883aa*
    - Garðaskøra
- Fríøkið millum Hvíldarheimið Naina og Hoydalsveg 19 *matr nr.784a*
    - Sponsk hindber ‘*rubus spectabilis’*

Henda royndarverkætlanin at basa innræsnu plantunum í útvaldu økjunum fevnir um, at arbeiðsfólk á Lendisliðnum koma at grava vøksturin burtur og eftirfylgjandi at bøta lendið.
Arbeiðið verður deilt upp í tveir partar, innræsnar plantur verða tiknar og burturbeindar frá mai til septembur, og frá septembur til apríl verður arbeitt við at burturbeina innræsnar runnar. Ætlanin er, at hetta verður gjørt í 2026/27.
Hareftir verður uppgávan framhaldandi at halda vøksturin niðri, um tað vísir seg, at hann kemur uppaftur.

Henda tilgongdin kemur at taka minimum 4 ár, áðrenn staðfestast kann, hvat krevst fyri at basa innræsnum plantum, sum eru á hesum økjum.

Møguleikar fyri samstarvi um at basa Garðaskøruni:
Visit Faroe Islands sendi ein fyrispurning inn í summar viðv. at fáa at ferðafólk og borgarar í kommununi í felag at arbeiða við at basa Skøruni í ávísum støðum í kommununi. Ætlanin er at byrja við økinum á veg til Kaldbaks. Endamálið er at fáa plantuna burtur. Verkætlanin leggur upp til, at ferðafólk og borgarar í mai mánað 2026 og í august 2026 fara at fremja arbeiðið, og síðani verður hetta arbeiðið endurtikið í 2027 og 2028. Eftir hetta kemur Lendisliðið at viðlíkahalda við vanligum arbeiðsgongdum.

Henda tilgongdin kemur at virka eins og *Closed for Maintenance*, har kommunan stuðlar við kr. 50.000 av kt. 6210, Fríðkan av býnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Náttúruverndarlógin, *Almenn fyrilitsskylda*

> **§ 4.** Øll hava skyldu til at fara fram við fyriliti og gera tað, sum rímiligt er, til, at náttúrumargfeldið ikki verður fyri skaða. Verður virkað sambært loyvi frá almennum myndugleika, er fyrilitsskyldan at rokna sum lokin, um fyritreytirnar fyri loyvinum framvegis eru til staðar.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Kommunan hevur áður roynt at basa Garðaskøruni við at játta stuðul til ítróttarfeløg og skúlaflokkar, sum hava ruddað ávís økir. Hesar royndir hava ikki givið ætlaða úrslitið. Orsøkin er, at tey, sum hava framt arbeiðið, ikki hava fingið neyðuga kunning og vegleiðing, og at eingin skipað viðlíkahaldsætlan hevur verið aftaná.

Í 2021 varð nógv Skøra skrásett ymsastaðni í kommununi. Og í 2025 hevur býargartnarin saman við umsitingini gjørt ávísar stakroyndir frá útvaldum økjum. Tað vísir seg, at økini, sum vórðu kannað, vísa, at Skøran spjaðir seg støðugt, og verður mett, at hon somuleiðis køvir føroyskan upprunavøkstur. Har Skøra veksur verður mett, at upprunavøkstur ikki megnar at yvirliva, og hetta er serliga tí, at Garðaskøran ikki setur treytir til vakstrarlíkindi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
24/08416 Garðaskøra – Alchemilla mollis

Niðanfyri standandi mál eru ymiskar áheitanir til kommununa um at fáa bæst innræsnum vøkstri.
25/05906 Áheitan til føroyskar kommunur
25/05907 Villini vøkstur
23/03739 Óynsktur vøkstur Handan Á 1, Tórshavn
23/03691 Fyrispurningur at fáa okkurt eitur at týna við í samband við burturbeinan av skøru
23/03645 Fyrispurning um skøru og lupinus
23/03576 Fyrispurning um samsýning fyri burturbeining av skøru í grannalagnum
23/02803 Týning av garðaskøru
22/04689 Innræsnar plantur í Tórshavnar kommunu
20/04422 Klaga um óynsktan vøkstur frá matr nr 874b sum kemur inn á ognina matr nr 873k
16/02198 Áheitan um at gera okkurt við óynsktan vøkstur á friðaðum øki hjá kommununi
14/04078 Skøran – oyðingsætlan uttan eitur

Harumframt eru nógvar áheitanir í DrifWeb um Garðaskøruna og annan innræsnan vøkstur.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Umhvørvisdeildin hevur varðað av hesum máli, og hevur Býarskipanardeildin yvirtikið málið eftir at Býargartnari var settur.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☒**

**Skjøl**
j.nr. 25/08053-5, *Uppruna málslýsing mál nr. 24_08416 Garðaskøra – Alchemilla mollis*
j.nr. 25/08053-4, 2025.03.09 Fundarfrágreiðing – VFI, VT og TK
j.nr. 24/08416-2, Garðaskøra – Alchemilla mollis

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | x | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Fyri at hetta arbeiðið kann setast í verk, so er neyðugt at Lendisliðið verður uppraðfest/mannað við einum eyka starvsfólki, umframt at neyðugt verður at keypa útgerð til endamálið.
Mett verður, at kt. 6212, Fríðkan og viðlíkahald, Lendisliðið, eigur at verða uppraðfest við kr. 500.000.

Ætlanin er at seta nýggja starvsfólkið í starv við ársbyrjan í 2026. Fíggingin fæst til vega við at gera eitt broytingaruppskot til fíggjarætlanina fyri 2026, har kr. 500.000 verða játtaðar til endamálið. Kt. 6212, Fríðkan og viðlíkahald, Lendisliðið, verður sostatt uppraðfest við kr. 500.000 í mun til upprunaliga fíggjarætlanaruppskotið.

Viðv. samstarvinum við Visit Faroe Islands og Visit Tórshavn, so verður mælt til at kt. 6210, Fríðkan av býnum, setur kr. 50.000 av til endamálið komandi 3 árini, í alt kr. 150.000. Henda upphæddin er umframt stuðulin til Closed for Maintenance. Upphæddin rúmast innan fyri verandi játtan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at verkætlanin at basa innrænsum vøkstri verður sett í verk.
- at kt. 6212, Fríðkan og viðlíkahald, Lendisliðið, verður uppraðfest við kr. 500.000, soleiðis at neyðuga fíggjarliga orkan verður til at fremja arbeiðið. Uppraðfestingin verður framd í broytingaruppskoti til fíggjarætlanina fyri 2026.
- at kt. 6210, Fríðkan av býnum, raðfestir kr. 50.000 árliga komandi 3 árini til samstarvið um at basa Garðaskøruni fram við vegnum til Kaldbaks.
- at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. november 2025:** Ein minniluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, Kári Johansen, tekur undir við tilmælinum, men við tí nágreining at parturin undir punkt 2 verður boðin út alment.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Heðin Mortensen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í allari viðgerðini.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Høgni Vilhelmsen legði fram broytingaruppskot um at taka undir við tilmælinum við tí nágreining, at parturin undir punkt 2 verður boðin út almen.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við fimm atkvøðum fyri og átta atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Síðani atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Blankt atkvøddu: Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

# 247/25 Eigarafeløgini Karlamagnusarbreyt 6 og 8 : Áheitan um skelting millum blokkarnar, so bilar ikki parkera á økinum, sum er ein brandvegur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 03.11.2025 | 68/25 | 25/05483-9 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 191/25 | 25/05483-9 |
| 3 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 247/25 | 25/05483-9 |

**Upprunin til málið**
Eftir áheitan frá eigarafeløgunum Karlamagnusarbreyt 6 og 8 og á eftirfylgjandi ástaðarfundi við umboð eru staðfestir manglar í sambandi við sjálvt útstykkingararbeiðið av Karlamagnusarbreyt.

Staðfestu manglarnir eru millum annað manglandi moldálegging á økið millum Karlamagnusarbreyt og Mylnutjørn, manglandi asfaltarbeiði á túninum eystan fyri tann eina íbúðarblokkin. Talan er um øki inni á litra z, sum er almennur vegur, og sostatt mangul upp á liðugtgerð av útstykkingar- og vegarbeiði.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd   Ja ☐   Nei ☐**

**Skjøl**
Notat frá ástaðarfundi, skjal nr.  25/05438-2
Kostnaðarmeting skjal nr.  25/05438-2
Málslýsing: Heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt jnr. 20/00622-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:**  ☒ Ja ☐ Nei

Víst verður til mál nr. 20/00622 Heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

| | **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 772<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 8175 | LK81999 | Vegir(íløgur) |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 8175 | L81047 | Karlamagnusarbreyt, liðuggerð | |

| **Upphædd** |
|---|
| 275.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 275.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til játta kr. 275.000 til verkætlan L81047 "Karlamagnusarbreyt liðuggerð" av løgukarmi, stovnsnr. 8175 Vegir(íløgur) LK81999 og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 03. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 773<br><br>Forkvinnunnar merki: |

## 248/25 Útstykking oman fyri Argjahamar - 21/01777

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 28/25 | 25/00252-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 111/25 | 25/00252-4 |
| 3 Tekniska nevnd | 01.09.2025 | 43/25 | 25/00252-4 |
| 4 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 210/25 | 25/00252-4 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.11.2025 | 214/25 | 25/00252-4 |
| 6 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 248/25 | 25/00252-4 |
| 7 Fíggjarnevndin | | | 25/00252-4 |

**Upprunin til málið**
Málið er lýst í málslýsing jnr. 21/0177-1 Útstykking oman fyri Argjahamar, sum er hjálagt sum fylgiskjal.

**Ískoyti**
Kunnandi fundur hevur verið við komandi grundstykkjaeigarar 12.05.2025. Greitt var m.a frá status í útstykkingararbeiðinum og teimum avbjóðingum, ið hava verið at halda tíðarætlanina. Sí annars skjal nr. 25/00252-5 250512 Borgarafundur.ppt. Talan hevur verið um manglandi tilfar til m.a. planering, og í tí sambandi hevur verið arbeitt við eini dagførdari tíðarætlan, sum vísir, at útstykkingararbeiðið ikki gerst liðugt fyrr enn fyrst í 2026. Harumframt hava trupulleikar staðist av ósprongdum dynamitti og broyting í verkætlanini, millum annað flytan av parti av Glyvursvegi.

Sáttmálin at gera útstykking oman fyri Argjahamar inniheldur liðuggerð av Glyvursvegnum, vegi 2 og 3, og planeringunum á økjunum 1, 3, 5, 6 og 7 (Vegir og øki omanfyri útstykkingina á Klingurstjørn og Hamaran).

Fyri veg 4, 5 og 6 fevnir sáttmálin um spreinging og grovplanering av økinum til vegir og sethúsabygging.

RTS (verandi arbeiðstakari) hava givið tilboð uppá liðuggerðina. Støða skal vera tikin til, um farast skal undir samráðingar við RTS um at undirskriva sáttamálan, so haldast kann fram við liðuggerðini av økinum niðanfyri Glyvursvegin, tvs, veg nr. 4, 5 og 6 (byggistig 2).

Tilboðið frá RTS er áljóðandi kr. 14.286.248 (uttan mvg).

Fíggjarlig viðurskifti:

Fíggjarlig uppgerð primo juni 2025:
Samlað játtan íalt tkr. 99.414

Brúktar eru tkr. 66.250
Avlop tkr. 33.164

Virðið á arbeiði at gera
frá nú og til avhending
uttan neyðugar tillagingar tkr. 37.079 (tilboðið á kr. 14,3 mió íroknað)

Framskrivað fíggjarstøða tkr. -3.915

Kunnað verður annars um tíðarætlanina.

**Skjøl**
j.nr. 25/00252-5 250512 Borgarafundur.ppt
j.nr. 21/01777-1 Útstykking oman fyri Argjahamar
j.nr. 25/00252-7 Tilboð Frá RTS - ÚOA2 Tilboðslist.pdf

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at gera sáttmála við RTS um gerð av 2. byggistigi innan verandi játtan.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Málið tikið av skrá.

**Ískoyti**
Eftir nýggja gjøgnumgongd av fíggjarstøðuni, eru tølini broytt nakað.

Fíggjarlig uppgerð medio august 2025: (avrundað)

| | |
|---|---|
| Samlað játtan íalt tkr. | 96.962 |
| Brúktar eru | 66.355 |
| Avlop | 30.607 |
| | |
| Virðið á arbeiði at gera, frá nú til avhending | 38.093 |
| Fíggjartørvur | 7.486 |

Orsøkin fyri henda fíggjartørv eru meiriútreiðslur til kr.:

1) Stig 1 (avrundað tøl)

| | | |
|---|---|---|
| a. | Ráðgeving til 1. stig: | 0,21 mió |
| b. | Manglandi grót til ífylling | 2,50 mió |
| c. | Eyka vatnleiðing | 0,70 mió |
| d. | Tillaging av arbeiðsvegi til RTS | 0,20 mió |
| e. | Index regulering stig 1 | 1,58 mió |
| f. | Kommunalt mvg | 0,81 mió |
| | | **5,99 mió** |

2) Stig 2 (avrundað tøl)

| | | |
|---|---|---|
| a. | Ráðgeving til 2. stig | 0,63 mió |
| b. | Matrikulering | 1,27 mió |
| c. | Innanhýsis projektering | 0,20 mió |
| d. | Kommunalt mvg | 0,93 mió |
| e. | Indexregulering stig 2 | 0,45 mió |
| f. | Ókendar útr. 6% av 1. og 2. stigi | 1,62 mió |
| | | **5,10 mió** |

3) Stig 1 og 2 Samanlagt **11.09 mió**

Samlaði fíggjartøvurin er sostatt ca. 11,09 mió kr, men vísandi til at partar av omanfyri standandi meirveitingum longu eru útgoldnir, er fíggjartørvurin fram til avhandan kr. 7,49 mió.

Útgreiningin av omanfyristandandi tølum, sí j.nr. 25/00252-79 (250820 Fíggjarligt yvirlit ÚOA.xlsx)

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6475 | LK64019 | Útstykking omanfyri Argjahamar | 6475 | L64019 | Útstykking oman fyri Argjahamar | | 7.486.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 104.447.653,29 |
| Áður játtað | Upphædd: | 96.962.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: 2022-26 | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | na |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða tkr. 7.486 av løgukarminum LK64019, Útstykking omanfyri Argjahamar, inn á verkætlanina L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar, undir konto 6475, Byggibúning bústaðir (íløgur), og at játtanin verður fíggjað við inntøku frá sølu av grundstykkjum.

**Tekniska nevnd 01. september 2025:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Heðin Mortensen, Anja Weyhe, tekur undir við tilmælinum, men ynskir at fáa eina frágreiðing frá ráðgevanum um, hví ein so stór roknivilla kann koma fyri.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til, at verkætlanarstýringin er ivasom og at peningurin hjá borgaranum ikki verður virdur.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 19. november 2025:** Boði Haraldson og Jóannes Jensen kunnaðu um málið. Tá frágreiðingin frá ráðgevanum kemur, verður málið lagt fyri aftur fíggjarnevndina.

Tróndur Sigurðsson metir, at verkætlanarstýringin er ivasom og at peningurin hjá borgaranum ikki verður virdur.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Kunnað varð um málið.

| | Býráðsfundur<br>20. november 2025 | Blað nr.: 777<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 249/25 Pedda við Stein gøta - Gongubreyt og asfaltering

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 03.11.2025 | 69/25 | 25/09309-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 193/25 | 25/09309-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 249/25 | 25/09309-1 |

**Upprunin til málið**
Kloakkarbeiði í Pedda við Stein gøtu.

**Lýsing av málinum**
Nú kloakkarbeiðið er við at vera liðugt, og útlit eru fyri, at fíggjarligt rúm er at útvega fígging til arbeiðið at asfaltera og gera gongubreyt á Pedda við Stein gøtu, er ynski um at fara undir hetta arbeiðið í inniverandi fíggjarári.

Umsitingin hevur gjørt eina kostnaðarmeting av arbeiðinum at gera gongubreyt á niðara parti av Pedda við Stein gøtu (j.nr. 25/09309-2).

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
25/09309-2 Asfaltera Pedda við Stein gøta.pdf

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

| | **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 778 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

Eykajáttan ☐

Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 8175 | LK 81999 | Vegaverkætlanir |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 8175 | | | Pedda við Stein gøta – Gongubreyt og asfalt |

| **Upphædd** |
|---|
| 1.264.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 40.000 |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

- játta kr. 1.264.000 av kto 8175 LK 81999 Vegaverkætlanir (íløgur), á nýggja verkætlan, kto 8175 " Pedda við Stein gøta – Gongubreyt og asfalt", fyri 2025 til at fyrireika útbjóðingartilfar til innbodna lisitatión
- og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 03. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 779 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 250/25 Útskiftan og umvælingar á Brennistøðini í 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 31.03.2025 | 25/25 | 25/04245-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 73/25 | 25/04245-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 107/25 | 25/04245-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.11.2025 | 63/25 | 25/04245-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 196/25 | 25/04245-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 250/25 | 25/04245-1 |

**Upprunin til málið**
Neyðug útskiftan og umvælingar á kommunalu Brennistøðini, sum skal gerast í 2025.

**Lýsing av málinum**
Á vári í 2024 var Rambøll biðin um at gera eina støðulýsing av Brennistøðini, har arbeiðssetningurin var:

1. Hvat skal gerast, fyri at Brennistøðin kann koyra í 10 ár afturat, fram til 31-12-2034
2. Tíðarætlan fyri nær tey ymisku arbeiðini skulu gerast
3. Kostnaðarmeting fyri tey arbeiði, sum skulu gerast

Í oktober 2024 fingu vit eina støðulýsing (hjáløgd), sum vísir, at fyri at Brennistøðin skal koyra trygt og undir galdandi reglum í 10 ár afturat, skulu útskiftingar, umvælingar og annað gerast fyri íalt kr. 36.100.000. Tá er keyp av Schreddara fyri kr. 3.000.000 við.

Vit hava keypt ein Schreddara, so samlaði fíggjartørvurin er kr. 33.100.000.

Tíðarætlanini, sum Rambøll hevur sett upp, vísir, at fíggingingin eigur at verða játtað soleiðis:

- Í 2025 kr. 20.750.000
- Í 2026 kr. 8.850.000
- Í 2027 kr. 2.750.000
- Í 2028 kr. 750.000

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Biðið verður um at fáa kr. 10.000.000 av løgukontu 7175, Renovatión (íløgur), í 2025, til at gera útskiftingar og umvælingar á Kommunalu Brennistøðini, sambært støðulýsing frá Rambøll.

Játtanin á hesi kontu fyri 2025 er íalt kr, 13.000.000, harafturat standa kr. 2.159.000 frá 2024, sum ikki eru brúktar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
j.nr. 24/07230 Støðulýsing av Brennistøðini 2024, sum hevur verið fyri í Náttúru- og Umhvørvisnevndini 2 ferðir til kunningar.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
25/04245-2 Støðulýsing frá Rambøll

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 780 |
| | Forkvinnunnar merki: |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 7175 | LK71999 | Renovatión | 7175 | | Útskiftingar og umvælingar á Kommunalu Brennistøðini | | 10.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á Brennistøðini mæla til, at játtaðar verða kr. 10.000.000,00 av løgukontu LK71999 Renovatión (íløgur), inn á nýggja verkætlan, Útskiftingar og umvælingar á Kommunalu Brennistøðini, bæði undir kt. 7175, til at gera útskiftingar og umvælingar á Kommunalu Brennistøðini, sambært støðulýsing frá Rambøll og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá Náttúru- og umhvørvisnevndini við tí treyt, at endalig góðkenning av ítøkiligum íløgum innanfyri játtanina skal fáast til vega frá fíggjarnevndini, tá ið kostnaðurin er kendur. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri ongari blankari atkvøðu og einari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Astrið Breckmann.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Til at gera útskiftingar og umvælingar á Kommunalu Brennistøðini eru játtaðar kr. 10 mió. av løgukarmi LK71999 Renovatión, á verkætlan L71008, Útskiftingar og umvælingar á Brennistøðini. Av hesum kr. 10 mió. eru kr. 750.000 síðani settar av til serstaka verkætlan L71017, Umvæling av skrivstovunum á Brennistøðini. So statt standa í løtuni kr. 9,25 mió. eftir á L71008, Útskiftingar og umvælingar á Brennistøðini.

Fíggjarnevndin samtykti 9. apríl 2025 at játta tær kr. 10 mió., við tí treyt at endalig góðkenning av ítøkiligum íløgum innan fyri játtanina á Løgukonto L71008, Útskiftingar og umvælingar á Brennistøðini, skal fáast til vega frá fíggjarnevndini, tá ið kostnaðurin er kendur. Tí verður málið lagt fyri fíggjarnevndina, nú fyrstu arbeiðini eru klár til at seta í verk.

Talan er um ymisk smærri arbeiði umframt prosjektering í sambandi við nýggja miljøstatión og nýggjan Economiser. Hesi arbeiði verða mett at kosta íalt kr. 1.700.000, sambært kostnaðarmeting j.nr. 25/04245-6.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á Brennistøðini mæla til, at játtaðar verða kr. 1.700.000 av løgukonto L71008, Útskiftingar og umvælingar á Kommunalu Brennistøðini, til tey arbeiði, sum eru nevnd í kostnaðarmetingini j.nr. 25/04245-6 og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Einmælt samtykt.

# 251/25 Nýggj stýriskipan til Brennistøðina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 03.11.2025 | 64/25 | 25/09301-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 195/25 | 25/09301-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 251/25 | 25/09301-1 |

**Upprunin til málið**
Kommunala Brennistøðin (KB) hevur gamlar elektroniskar stýriskipanir til sítt virksemi. Fyri at lyfta arbeiðið hjá KB upp á eitt tíðarhóskandi støði og nútímansgera virksemið, er neyðugt við nýggjari skipan, sum eisini samlar alt virksemi.

**Lýsing av málinum**
Mælt verður til at nýta skipanina Tarp frá Poul Tarp. Hendan skipan dekkar alt øki hjá KB, og tí er upplagt at velja hesa. Skipanin verður m.a. knýtt til aðrar skipanir, sum fer at lætta um arbeiðsgongdir, skrásetingar og viðlíkahald. Hóast aðrar skipanir finnast, sum kunnu veita somu tænastu, er skipanin Tarp longu ment til føroyska økið, og hevur eisini support í Føroyum

<u>Skipanin:</u>
<u>Ruskinnsavning:</u> Núverandi skipan, LiveAsset, verður ikki nýtt, tí skannararnir at skráseta bingjur virka ikki. Harumframt er skipanin ikki dagførd til tørvin hjá KB. T.m. at í løtuni verður alt skrásett manuelt, sum ikki er nøktandi.

Við nýggju skipanini, Tarp, hevur ruskinnsavningin møguleika at skráseta hendingar, sum t.d. nær og um posin er tikin, hví hann ikki verður tikin, og mynd kann takast, sum skjalprógv. Harumfram fáa Ruskinnsavnararnir m.a. ein digitalan koyrilista. Hetta fer at lætta um arbeiðið og geva betri kundatænastu hjá bæði ruskinnsavningini og móttøkuni hjá KB.

<u>Tangatøming:</u> Núverandi skipan, LiveAsset, hjá Rottangatømingini er ikki nøktandi, tí hon er ikki dagførd til tørvin, sum KB hevur, eins og hjá Ruskinnsavningini.

Nýggja skipanin, Tarp, fer at gera tað lættari at krevja inn gjald frá vinnufyritøkum og húsum uttan fastbúgvandi borgarar. Nýggja skipanin fer harumframt at gera tað møguligt at boða frá trupulleikum við eini talgildari skráseting, og harvið kunnu vit geva boðini víðari til eigaran av tanganum.

<u>Endurnýtslan</u>**<u>:</u>** Núverandi skipan, ScanVekt, nøktar ikki tørvin hjá Endurnýtsluni. Gerandisdagar koyra uml. 600 bilar inn á Endurnýtsluna um dagin, og upp ímóti 1000 bilar leygardagar. Við verandi skipan, er ikki møguligt at skilja ímillum, um ein bilur er vinnuligur, ella um ein bilur er skásettur í aðrari kommunu enn TK.

Nýggja skipanin, Tarp, hevur ein nummarplátu avlesara, sum ger tað møguligt at skráseta allar bilar, sum koyra inn á Endurnýtsluna. Hetta ger tað møguligt at senda rokning sjálvvirkandi til allar vinnufyritøkur og privat, sum ikki eru búsitandi í TK. Hetta er ein alneyðug skipan, sum kemur Endurnýtsluni til góðar.

<u>Árligt gjald fyri nýggju stýriskipanina:</u>
Árligt gjald fyri hald og support verður áleið 90.000 kr. árliga.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

| **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 783 |
|---|---|
| | Forkvinnunnar merki: |

Bólkur við umboðum frá KT-deildini, fíggjardeildini og Kommunalu Brennistøðini hevur arbeitt við málinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
j.nr. 25/03238 Raðfestingar á løgukonto 7175, renovasjón 2026, har tað eru avsettar íalt kr. 1,8 mió. til nýggja stýriskipan.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Er gjørt í samstarvi við KT-deildina og Fíggjardeildina.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☒**

**Skjøl**
j.nr. 25/09301-4 Samlað kostnaðarmeting og rakstur

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 7175 | LK71007 | Brennistøðin,høll til skiljing, endurnýtslu o.a. | 7175 | | | Nýggj stýriskipan til Brennistøðina | 1.800.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 1.800.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á Brennistøðini mæla til at játta kr. 1.800.000 av konto 7175, Løgukarmur LK71007, á nýggja verkætlan "Nýggj stýriskipan til Brennistøðina", og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 03. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Guttormur í Skála luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Einmælt samtykt.

# 252/25 Trivnaðarøkið við bátahylin í Álakeri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 11.02.2025 | 5/25 | 25/02161-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 30/25 | 25/02161-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 52/25 | 25/02161-1 |
| 4 Havnanevndin | 03.06.2025 | 27/25 | 25/02161-1 |
| 5 Havnanevndin | 30.09.2025 | 37/25 | 25/02161-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 198/25 | 25/02161-1 |
| 7 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 252/25 | 25/02161-1 |

**Upprunin til málið**
Verkætlan um bátahavn í Álakeri.

**Lýsing av málinum**
Bátahavnin í Álakeri er í dag vorðið til eitt dragandi virki øki við ymsum maritimum virksemi og brúkarum. Umframt vanliga virksemi hjá útróðrarbátum og smábátum, er eisini ymiskt annað maritimt virksemi í økinum.
Tvey nýggj róðrarneyst hjá róðrarfeløgunum í Havn standa í gerð, og tey fara at savna bæði ung og eldri um kapppróðrarítróttina. Kajakkfelagið er eisini virkið í økinum.
Teinæringurin Royður og 6 mannafarið Leiftur, ið verða nýttir í.s.v. undivísing í fólkaskúlum og til tilboð hjá serstovnum, hava eisini fingið fast pláss beint við dráttin.

Tað hevur leingi verið ynski um at fáa skipað eitt trivnaðarøki í.s.v. nýggju bátahavnina í Álakeri.
Í upprunaligu høvuðsverkætlanini fyri bátahavn í Álakeri var eitt øki avsett til trivnaðarøki, men økið datt burtur, tá ið róðrarneystini hjá róðrarfeløgunum vórðu staðsett á núverandi stað.
Soleiðis sum bátahavnin er skipað nú, verður mett at økið eystanfyri Bátatænastuna, við norðastu bátabrúnna, er best egnaða staðið til at skipa sum trivnaðarøki.

Eitt trivnaðarøki við einum felagshúsi kann geva møguleikar fyri ymsum virksemi, ið kann gagna økinum og trivnaðinum hjá borgarunum, og niðanfyri eru nøkur dømi:

<u>Maritimur skúladepil</u>
Fólkaskúlar og serstovnar, sum brúka bátarnar Royð og Leift í teirra undivísing og tilboðum, hava eftirlýst betri karmar til slíkt virksemi, t.d. høli at savnast í og pláss at goyma bjarginarvestar og aðra útgerð. Hetta kundi hóskandi verið í einum felagshúsi á ætlaða trivnaðarøkinum.

<u>Undirhús</u>
Tað er tørvur á einum nýggjum undirhúsi í Havn. Eitt undirhús hevði ligið væl í Álakeri, tí har savnast fólk longu í virkna maritima umhvørvinum. Undirhúsið kundi verið partur av einum felagshúsi á ætlaða trivnaðarøkinum.

<u>Vælveruøki við “saunadypp” og heitum og køldum pottum</u>
Kommunan og Tórshavnar havn hava fingið fleiri fyrispurningar um, hvar møguleikar eru fyri at hava baðstovur (“saunadypp”) og heitar og kaldar pottar.
Í Hoyvík er tað ein avbjóðing at hava slíkt virksemi, tí tað vindur upp á seg við fleiri pottum og baðstovum, sum ger, at bátarnir, ið standa har, sleppa ikki út.

Í Álakeri er gott pláss til slíkt virksemi, og ætlaða trivnaðarøkið kann skipast soleiðis, at pláss verður til baðstovur og pottar við heitum og køldum reinsaðum vatni.
Tað, ið tey virkandi innan fyribrigdi "Saunadypp" eftirspyrja, eru hølir til skiftingarrúm, sum eisini kundi verðið partur av virkseminum í einum felagshúsi á trivnaðarøkinum.

Skipan av økinum
Fyri at trivnaðarøkið og serliga felagshúsið skal fáast at virka, er neyðugt at onkur dagliga hevur uppsýn við økinum og húsinum, og at ein kalendaraskipan til húsið fæst at virka.
Á viðlíkahaldsøkinum í Álakeri hevur Tórshavnar havn eitt fólk í arbeiði nakrar tímar um vikuna, fyri at halda skil á økinum. Hendan skipan hevur virkað sera væl. Hugsast kann, at ein líknandi skipan kann gerast fyri trivnaðarøkið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Á íløguætlanini hjá Tórshavnar kommunu fyri 2025 eru avsettar 3,0 mió kr til trivnaðarøkið í Álakeri.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/léttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til at játta 0,1 mió av deild 7476 "Smátahavnir" til fyrirreiking av verkætlan fyri trivnaðarøki í Álakeri og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 11. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Sp/F Ráð hevur í samráð Tórshavnar havn gjørt útbjóðingartilfar til eitt trivnaðarhús.

Útboðið er skipað sum ein verkætlanarkapping í heildararbeiðstøku við føstum mestaprísi. Sambært útboðsskrivinum er endamálið við húsinum at skapa karmar fyri virksemi, sum er rættað móti sjónum og virkemi, sum er staðsett í Álakeri. Tað er:

1) ástøðiligur og verkligur sjómannskapur og fisking hjá skúlaflokkum
2) betra um umstøðurnar til virksemið hjá Rescue Lív á landi
3) vera savningarstað fyri serliga eldri borgarar “undirhús”, sum nýta økið
4) at vera karmur um møguliga “dypping”, sum kann vera á økinum við bátahylin
5) alment WC

Útboðið snýr seg um kapping um høvuðsarbeiðstøku, har bjóðandi skal koma við uppskoti til bygning til endamálið sambært byggi- og kappingarskrá. Ætlanin er at bjóða 3 arbeiðstakarum at luttaka í kappingini. Vinnandi uppskotið verður funnið út frá ásetingunum í kappingarskránni. Fyri uppskotini, sum ikki vinna, men tó lúka treytirnar, verður latin samsýning á 20.000,- kr.

Fíggjarkarmurin er í mesta lagi 2,9 mió kr og við málsettum prísi á 2,4 mió kr. Samlaða nettovíddin av bygninginum er um 110 m². Bygningurin skal hava grøna orkuskipan.
Arbeiðstakarin skal útvega øll neyðug loyvir.

Ætlanin fyri trivnaðarøkið leggur upp til, at eitt útigólv (terassa) skal vera kring bygningin, men tað er tó ikki við í hesi verkætlan um húsið.

Verkætlanirnar verða mettar av eini dómsnevnd, sum er samansett við umboðum frá Byggi- og býarskipanardeildini og Tórshavnar havn. Sambært kappingarskránni verða tilboðini mett út frá hesum metingarstøðum: .

- Byggifrøði og funktionnalitetur..................... 40 %
- Verkætlanarbygnaður og processlýsing...... 25 %
- Prísur.......................................................... 35 %.

Tíðarætlan fyri útbjóðingina sær soleiðis út:

| | |
|---|---|
| Útbjóðing til arbeiðstakarar: | 04.06.2025. |
| Tilboð latast inn: | 22.07.2025 |
| Støðutakan til tilboð (dómsnevndin): | 28.08.2025 |
| Samráðing fram til: | 18.09.2025 |
| Havnanevndin taka støðu: | 30.09.2025 |
| Býráðið góðkenna og játta fígging: | 23.10.2025 |
| Arbeiðið kann byrja: | 27.10.2025 |
| Arbeiðið liðugt: | 15.06.2026 |

**Skjøl:**
1. Útboðsbrævi (UB), dagfest 27.05.2025
2. Kappingarskrá, dagfest 27.05.2025
3. Byggiskrá (BS), dagfest 27.05.2025
4. Tilboðsskjal dagf. 27.05.2025

**Tilmæli:**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til, at verkætlanin verður boðin út sum heildararbeiðstøka í kapping millum 3 arbeiðstakarar, sambært lýsingini omanfyri og viðlagda útbjóðingartilfarinum, og at tilboðini og dómsnevndarúrskurðurin verða løgd fyri havnanevndina til støðutakan á næstkomandi fundi hin 30. september 2025.

**Havnanevndin 03. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Skjøl:**
25/02161-8 : Tilboð frá sp/f VD uppá trivnaðarhús
25/02161-9 : Heildararbeiðstøkusáttmáli við skjølum
25/02161-11: Uppskot frá dómsnevnd til broyting í innrætting.

**Ískoyti:**
Verkætlanin hevur verið í útboð millum 4 arbeiðstakarar, men bert 1 tilboð kom inn. Sp/f VD v/Valbjørn Dalsgarð hevði einasta boð, ið er áljóðandi 2,9 mió u/MVG, sum eisini svarar til max í ásetta fíggjarkarminum.
Kostnaðurin í tilboðnum er treytaður av, at byggiharrin/Tórshavnar havn veitir byggistreym og tryggjar arbeiðið, og at arbeiðstakarin sleppur at læna trukk frá Tórshavnar havn umframt hølir at byggja elementir í (slógvrúmið í Bacalao). Umsitingin metir, at hesi krøv kosta ikki Tórshavnar havn nógv, og kunnu tískil gangast á møti.
Harumframt ynskir arbeiðstakarin, at tíðarætlanin verður broytt í mun til útbjóðingartilfarið, soleiðis at arbeiðið kann byrja 27/10-2025 og enda 27/10-2026. Tórshavnar havn metir, at ynski um broytta tíðarætlan eigur kann gangast á møti.

Dómsnevndin hevur gjøgnumgingið uppskotið til trivnaðarhús, ið Arkitektar 99 hava teknað vegna Sp/f VD. Dómsnevndin metir, at trivnaðarhúsið livir upp til endamálið við húsinum og lýkur ásettu treytirnar í útbjóðingartilfarinum. Dómsnevndin hevur ikki givið stig í hesum førinum, tí bert eittans tilboð var at meta um.

Dómsnevndin mælir tó til smávegis broytingar í innrættingini, sum eru at strika tað eina goymslurúmið, leggja bæði skiftingarrúmini saman til eitt skiftingarrúm (tó við løttum skiljiveggi), soleiðis at felagsrúmið í staðin kann gerast størri. Hesar broytingar eru umrøddar við tilboðsgevarin og ávírka ikki kostnaðin.

Ráðgevin sp/f Ráð hevur gjørt uppskot til heildararbeiðstøkusáttmála (J.nr. 25/02161-9).

**Tilmæli**
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til:
- at taka av tilboðnum frá sp/f VD upp á trivnaðarhús í Álakeri áljóðandi 2,9 mió kr. u/mvg
- at gera heildararbeiðstøkusáttmála við sp/f VD um arbeiðið sambært tilboðnum og við smærri broytingum sum nevndar í málslýsingini omanfyri
- at játtaðar verða 2,9 mió kr. av løgukarmi fyri smábátahavnir LK74999,
  og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 30. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**

Kári Johansen krevur málið fyri fyrst komandi býráðsfund til atkvøðugreiðslu.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 790<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 253/25 Umsókn um longda tíðarfreist uppá játtaðan stuðul til nýggju kirkju á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 200/25 | 25/00251-2 |
| 2 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 253/25 | 25/00251-2 |

**Upprunin til málið**
Tilsøgn um stuðul til útiøki og parkeringsøki gongur út.

**Lýsing av málinum**
Kirkjuráðið á Argjum fekk í 2021 játtað kr. 5 mió frá býráðnum til gerð av útiøki og parkeringsøki v.m. afturfyri, at almenningurin fær atgongd til parkeringsøkið. Tá varð sett treyt, at er byggingin ikki byrjað í seinasta lagi 31. desember 2025, fellur tilsøgnin burtur.

Kirkjuráðið ger í skrivi 1. oktober 2025 vart við, at av ymsum orsøkum er byggingin seinkað so mikið, at vandi er fyri, at byggingin ikki kann byrja í ár. Kirkjuráðið heitir tí á býráðið um at leingja tíðarfreistina.

Forfólkið í kirkjuráðnum hevur 3. november 2025 upplýst umsitingini, at bíðað verður eftir endaligum loyvi frá landsstýrinum, og at gongd er í málinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
16/02717 Áheitan vegna kirkjuráðið á Argjum um fund um ymiskar fyrispurningar í sambandi við byggjan av nýggjari kirkju á Argjum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 791<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla til at leingja tilsøgnina kr. 5 mió til og við 31. desember 2028.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Einmælt samtykt.

## 254/25 Makaskifti skúlabygningar á Frælsinum og Hoydølum - 22/03066

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 96/25 | 25/00319-1 |
| 2 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 133/25 | 25/00319-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.11.2025 | 213/25 | 25/00319-1 |
| 4 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 254/25 | 25/00319-1 |

**Upprunin til málið**
Felags áhugamál millum Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið.

**Lýsing av málinum**
Síðani Skúlin á Fløtum flutti úr bygningunum á Frælsinum hevur samskifti við millumbilum verið millum Tórshavnar kommunu og Føroya landsstýri um, hvat bygningarnarnir á Frælsinum, ið eru samogn millum landið og kommununa, skulu brúkast til.

Partur av hesum samskifti hevur snúð seg um skúlabygningin í Hoydølum, ið somuleiðis stendur tómur.

Í eini roynd at finna eina loysn á fleiri avbjóðingum undir einum, eru Tórshavnar kommuna og Mentamálaráðið komin ásamt um at leggja fram eina makaskiftisloysn, ið loysir hølistrupulleikarnar hjá bæði landsmyndugleikunum og kommununi og letur upp fyri, at sjøtul kann setast á stóru campus-verkætlanina hjá Fróðskaparsetrinum á Frælsinum.

Fróðskapasetur Føroya heldur í dag til í fleiri bygningum, eitt nú í Sjóvinnuhúsinum hjá Tórshavnar kommunu. Ein ætlan um at savna Fróðskaparsetrið í einum campus-øki á Frælsinum hevur leingi verið í umbúna.

Samstundis hevur kommunalt politiskt ynski verið frammi um at savna alla fyrisitingina hjá Tórshavnar kommunu á einum stað.

Við at flyta Fróðskaparsetrið úr leigumálinum í Sjóvinnuhúsinum og út í bygningarnar á Frælsinum og við at flyta fyrisitingina hjá kommununi úr mongu bygningunum í miðbýnum og út í Sjóvinnuhúsið, verða atlit tikin til ynskini hjá bæði Tórshavnar kommunu og Fróðskaparsetrinum.

Tórshavnar kommuna eigur 40% av bygninginum og økinum á Frælsinum, og landið eigur hini 60 %. Harumframt eigur Tórshavnar kommuna 100% av lon 4, ið er sambygd restina av bygningunum á Frælsinum.

Í eini avtalu, ið samstundis er ein makaskiftisavtala, er ætlanin at lata landinum ognarrættin á teimum 40% av samognini á Frælsinum umframt alla lon 4, móti at kommunan fær gamla studentaskúlabygningin í Hoydølum, og at kommunan samstundis gerst leys av einum gávulyfti, ið Tórshavnar býráð í 1990 gav Fróðskaparsetrinum um at lata lendi til víddar umleið 50.000 m² til nýtt Fróðskaparsetur í Marknagili.

Avtalan inniber somuleiðis, at Fróðskaparsetrið fer úr leigumálinum í Sjóvinnuhúsinum skjótast gjørligt og í seinasta lagi við ársenda 2024.

Avtalan er somuleiðis treytað av, at Løgtingið góðkennir avtaluna millum partarnar, og at Løgtingið setir neyðuga peningin av til at umvæla bygningarnar á Frælsinum eftir eini nærri ásettari ætlan.

Tórshavnar kommuna treytar sær við makaskiftavtaluni, at bygningarnir á Frælsinum verða til almenn útbúgvingar- og granskingarendamál hjá Fróðskaparsetur Føroya, og/ella sum lestraríbúðir.

Føroya Landsstýri treytar sær við makaskiftisavtaluni, at ræðisavmarkandi byrður kunnu verða lýstar á ognina í Hoydølum, undir hesum, at ognin einans skal kunna nýtast til almannagagnligt virksemi hjá Tórshavnar kommunu og forboð móti sølu ella avhendan av ognini.

Við at taka undir við omanfyristandandi prinsippavtalu, taka býráðið ávikavist Føroya Landsstýrið undir við, at farið verður undir eina tilgongd at fremja ætlaðu felagsloysnina. Hetta inniber millum annað, at bygningarnir á Frælsinum og í Hoydølum og lendið, ið kommunan lat sum gávu í 1990 verður virðismett av óheftum ognarmeklara, so eitt makaskifti kann gerast, ið tekur hædd fyri virðunum, ið báðir partar lata og fáa við ætlaða makaskiftinum.

Farið verður eftir ætlan undir hetta arbeiðið beinanvegin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003.

Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Principavtala dagførd 20. juni 2022 – Við dagføringum, j.nr. 22/03066-2
Skjal 3 - Leigusáttmálin SVH, j.nr. 22/03066-3
Skjal 2 - Býráðssamtykt 1990 o.a., j.nr. 22/03066-3
Skjal 4 - Kostnaður – Sjóvinnuhúsið, j.nr. 22/03066-3
Skjal 6 - Íløguætlanin, j.nr. 22/03066-3
Skjal 1 - Yvirlit yvir lendistørvi, j.nr. 22/03066-3
Skjal 5 - Servituttur á matr. nr. 18 Hoyvík, j.nr. 22/03066-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til

prinsippavtalu millum Tórshavnar kommunu og Føroya landsstýrið og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:**
Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:**
Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av samtyktini á býráðsfundi 22. juni 2022 hava Tórshavnar kommuna og Uttanríkis- og mentamáláráðið heitt á óheftan meklara um at meta um virðið á ognunum, ið ætlanin er at makaskifta.

Meklarafyritøka hevur mett virði á tí partinum av ognini á Venjingarskúlanum, ið er felags ogn til 79.700.000 kr.

Kommununnar patur, ið er 40% av ognini, er sostatt mettur til 31.908.000 kr.

Lon 4, ið stendur á matr. nr. 1031a, ið er ogn hjá Tórshavnar kommunu, er mett til 13.000.000 kr. Viðvíkjandi bygningunum hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum í Hoydølum er skúlabygningurin, ið stendur á matr. nr. 19, mettur til 32.500.000 kr.

Lonirnar, ið standa á matr. nr. 18 í Hoydølum, eru virðismettar til 4.500.000 kr. Talan er um lonir, ið kunnu takast sundur og flytast av økinum. Hesar hýsa í dag dagstovnavirksemi og eitt serskúlatilboð hjá Tórshavnar kommunu og hava tær tíðaravmarkað loyvi frá Yvirfriðingarnevndini at standa á lendinum í Hoydølum inntil ársskiftið 2023/24.

Í tilgongdini síðani prinsippavtalan millum Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið varð samtykt í býráðnum 22. juni 2022, eru partarnir vorðnir samdir um at avgreiða viðurskiftini sína millum sum avtalur um keyp og sølu heldur enn við makaskiftisavtalu.

Mett verður, at hesin leistur er minni drúgvur at koma á mál við enn leisturin við makaskifti. Hesin leistur krevur fyri kommununnar viðkomandi bert býráðsins góðkenning og skal ikki eins og ein makaskiftisavtala góðkennast av kommunala eftirlitinum hja Úmhvørvis- og vinnumálaráðnum.

Partarnir hava tí endurskoðað prinsippavtaluna sína millum og verður hendan hervið løgd fyri býráðið til støðutakan.

Sambært endurskoðaðu prinsippavtaluni keypir Uttanríkis- og mentamálaráðið kommununnar lut av felagsognini á Frælsinum og lon 4, ið kommunan í dag eigur einsamøll.

Kommunan keypir gamla studentaskúlabygningin í Hoydølum, lonirnar, sum í dag hýsa dagstovnavirksemi og serskúlatilboði hjá Tórshavnar kommunu og undirlendið undir hesum bygningum, ið verður frábýtt til egið matrikulnummar og verður til víddar uml. 12.500 m².

Við avtaluni verður Fróðskaparsetrið uppsagt úr leigumáli sínum í Sjóvnnuhúsinum, og flytir Fróðskaparsetrið stigvíst úr bygninginum, til alt virksemið er flutt úr húsinum við árslok 2024. Fyri at siga sáttmálan upp í úrtíð verður rindað eitt endurgjald áljóðandi 4.200.000 kr. fyri part av teimum íløgum, Fróðskaparsetrið hevur gjørt í leigumálið í leigutíðarskeiðinum.

Eisini inniber avtalan partanna millum, at Tórshavnar kommuna tekur aftur og er leys av gávulyftinum, ið Tórshavnar býráð gav Fróðskaparsetrinum í 1990 um at lata lendi til víddar umleið 50.000 m² til nýtt Fróðskaparsetur í Marknagili.

At enda inniber prinsippavtalan, at Uttanríkis- og mentamálaráðið rindar Tórshavnar kommunu 1.854.000 kr. til tess at gera upp fyri munin millum virðið á omanfyri nevndu ognum á Frælsinum og í Hoydølum.

Fyriliggjandi prinsippavtala slóðar fyri, at Fróðskaparsetrið kann fara undir tilgongdina at umvæla, menna og flyta inn í eitt nýtt kampus á Frælsinum, og at Tórshavnar kommuna fær ræði á Sjóvinnuhúsinum og ognunum í Hoydølum til framtíðar kommunal endamál.

Fíggjarliga hevur prinsippavtalan ikki beinleiðis útreiðslur við sær fyri kommununa. Kommunan fær, tá ið øll viðurskifti sambært avtaluni eru komin upp á pláss, eina eingangsupphædd áljóðandi 1.854.000 kr. frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum, og er hetta einasta ítøkiliga peningaflyting, sum avtalan hevur við sær.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og Trivnaðarstjórin mæla fíggjarnevndini til at taka undir við fyriliggjandi, endurskoðaða uppskoti til prinsippavtalu millum Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 26. september 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. september 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Samsvarandi býráðssamtyktina 29. september 2022 gjørdu Tórshavnar kommuna og táverandi Utttanríkis- og mentamálaráðið hin 3. november 2022 treytaða avtalu (nevnd "Treytað avtala millum Tórshavnar kommunu og Uttanríkis- og mentamálaráðið viðv. Kampusøki á Frælsinum í Tórshavn").

Sum liður í avtaluni bant landið seg m.a. til, at Fróðskaparsetrið skuldi flyta úr leigumálinum í Sjóvinnuhúsinum í seinasta lagi við ársenda 2024. Hetta er enn ikki framt í verki.

Sum ein liður í avtaluni hevur landið goldið fyri at yvirtaka kommunurnar part av matr.nr. 1071d, Tórshavn, og matr.nr. 1031a, Tórshavn, sum kommunan átti 100%. Roknistykki sær soleiðis út:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr. 1017d, Tórshavn. | kr. | 31.908.000,00 |
| Matr. nr. 1031a, Tórshavn. | kr. | 13.000.000,00 |
| = | kr. | 44.908.000,00 |
| *Mótrokning fyri íløgur í Sjóvinnuhúsið* | *kr.* | *-4.240.000,00* |
| **= Netto** | **kr.** | **40.668.000,00** |

Nettoupphæddin er komin á konto hjá kommununi 27. juni 2023, og ognirnar eru síðani tinglýstar við ognarheimild til Føroya Landsstýri. Tó er eisini framd ein mótrokning við støði í at Fróðskaparsetrið skuldi fara úr Sjóvinnuhúsinum sambært eini tíðarætlan, ið síðani ikki hevur víst seg at halda. Mett verður tí, at grundarlag er fyri at taka støddina av mótrokningini upp til nýggja viðgerð.

Formliga yvirtøkan og endaliga matrikuleringin av økinum í Hoydølum er ikki framd í verki. Sambært avtaluni skal kommunan yvirtaka ognirnar í Hoydølum fyri kr. 32.500.000 og lonirnar fyri kr. 4.500.000; tils. kr. 37.000.000. Partarnir undirritaður 25. mai 2023 eitt treytað skeytið hesum viðvíkjandi.

Tað hevur verið uppá tala at broyta byggisamtyktina fyri økið í Hoydølum, men hendan ætlan er seinni slept. Í løtuni hevur Tórshavnar kommuna ongar langtíðarætlanir við gamla studentaskúlanum ella við lonunum á verandi staðseting.

Í samskifti við landsstýrið er komið fram, at Almanna- og mentamálaráðið hevur áhuga í at nýta gamla studentaskúlan og aðrar bygningar, sum landið eigur í nærumhvørvinum, til at hýsa Tjóðsavninum. Landið ynskir tí at broyta avtaluna við kommununa soleiðis, at kommunan kortini ikki yvirtekur studentaskúlan.

Lonirnar standa á økinum við fyribils loyvi, ið gongur út í 2026. Tær skulu tí flytast av økinum. Trivnaðarstjórin metir, at lonirnar framvegis kunnu hava nýtsluvirði fyri kommununa, t.d. sum fyribils skúlastovur. Hetta er tó treytað av, at prísurin er hóskandi, at tær kunnu flytast uttan týðandi konstruktiónsskaðar, o.s.fr. Hesi viðurskifti mugu kannast nærri, áðrenn endalig støða verður tikin til, hvat gerast skal við lonirnar.

*Ognin, sum Tórshavnar kommuna sambært avtaluni skuldi yvirtaka: sí skjal 22/03066-3 skjal 1 – Yvirlit yvir lendistørvi*

*Kort yvir verandi matrikuleru viðurskifti í økinum: sí skjal nr. 25/00319-2*

Sambært § 5 í omanfyrinevndu avtalu frá 3. november 2022 kann verða kravt, at ognirnar skulu ganga aftur, um ávísar treytir í avtaluni ikki verða hildnar. Mett verður tó, at tað ikki neyðturviliga er til fyrimuns fyri nakran partin, um hetta verður kravt.

Áðrenn hetta kann verða kravt eiga partarnir tí at troyta teir møguleikar, ið eru fyri einari samlaðari loysn, sum tekur hædd fyri broyttu viðurskiftunum í málinum.

Greitt er ikki, nær landsstýrið fremur ætlanina um Tjóðsavn í Hoydølum. Politiskt ynski frá kommununi er at virka fyri betri arbeiðsumstøðum til skapandi listafólk, tá ið talan er um arbeiðshøli, høli til venjingar, framførslur og framsýningar, og í hesum sambandi at Studentaskúlin verður karmur um hetta fram til, at tjóðsavnslætlanin fer í gongd. Samráðing skal takast upp við landsstýrið um hetta. Almanna- og mentamálaráðið hevur frammanundan avtalu við LISA um nakað líknandi í øðrum bygningum í Hoydølum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla til:

- at ynskið hjá landinum um ikki at avhenda ognirnar í Hoydølum við lendi o.a. verður gingið á møti,
- at avtalan millum kommununa og landsstýrið verður broytt soleiðis, at kommunan ikki keypir gamla studentaskúlan,
- at kommunan eftir nærri tørvsmeting og kanningar tekur upp samráðingar við landið um at yvirtaka lonirnar fyri í mesta lagi kr. 4.500.000, og at
- kommunan setir fram samráðingarkrav mótvegis landinum um at tillaga mótrokningina hjá landinum fyri íløgur í Sjóvinnuhúsið vísandi til, at landið ikki er farið úr hølunum til væntaða tíð, og
- at partarnir gera tíðaravmarkaða avtalu um at brúka Studentaskúlan til listaligt virksemi fram til, at tjóðsavnsætlanin verður framd.

Mælt verður til, at umsitingin innanfyri omanfyrinevndu karmar fær heimild at samráðast við landsstýrið og leggja úrslitið av hesum fyri fíggjarnevndina til endaliga góðkenning við teimum broytingum, ið ein endalig semja krevur.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum við teirri viðmerking, at kostnaðarviðurskifti viðvíkjandi keyp, flutningi, byggibúgving v.m. av lonunum verða greinaði nærri, áðrenn samráðingar við landið verða tiknar upp.

Málið verður beint í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum, men mælir frá at kommunan yvirtekur lonirnar fyri upp til 4,5 mio. kr.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum frá meirilutanum í fíggjarnevndini við tí ískoyti, at úrslitið av einari endaligari semju kemur fyri bæði fíggjarnevndina og býráðið til góðkenningar.

**Ískoyti:**
Býráðið samtykti tann 22. mai 2025 at ganga ynskinum hjá landinum á møti um ikki at avhenda ognirnar í Hoydølum við lendi o.a., og at avtalan millum kommununa og landsstýrið verður broytt soleiðis, at kommunan ikki keypir gamla studentaskúlan.

Fyri at hendan býráðssamtyktin kann útinnast, er neyðugt at býráðið samtykkir semjuuppskotið um, at ognin ikki verður yvirtikin av kommununi, men framhaldandi verður landsins ogn.

Við hesum verður formell avtala gjørd partanna millum um at strika keypið, og samstundis verður peningurin kr. 32.500.000 leysgivin, sum varð støðlaður til keypið, og at flyta hendan peningin aftur á konto 6175 *keyp og sølu*.

**Skjøl:**
25/00319-8: "*Uppskot til semjusáttmáli um Gamla Studentaskúlan millum landsstýrið og kommununa*"

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina, at samtykkja uppskotið til semjusáttmála um Gamla Studentaskúlan, og at flyta tann støðlaða peningin kr. 32.500.000 til keypið aftur á konto 6175 *keyp og søla*.

**Fíggjarnevndin 19. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Einmælt samtykt.

# 255/25 Hølisviðurskifti hjá fyrisitingini hjá Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 204/25 | 25/09097-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 255/25 | 25/09097-1 |
| 3 Býráðsfundur | | | 25/09097-1 |

**Upprunin til málið**
Ætlanir hava leingi verið um at flyta alla miðfyrisitingina í Tórshavnar kommunu undir sama tak.

**Lýsing av málinum**
Í Tórshavnar kommunu hava ætlanir í fleiri ár verið um at flyta miðfyrisitingina undir sama tak, men eingi høli hava verið tøk til kunna fremja hesa ætlan í verki.

Mest ítøkiliga uppskotið til hesa ætlan hevur verið at savna miðfyristingina úti í Sjóvinnuhúsinum, men Sjóvinnuhúsið hevur higartil ikki verið tøkt at flyta inn í. Eingin umbøn um játtan til at fyrireika og fremja ætlanina at flyta miðfyrisitingina í Tórshavnar kommunu út í Sjóvinnuhúsið hevur tí verið fyri í býráðnum.

Uppgávan at byrja flytingina av miðfyrisitingini er vorðin rættiliga átrokandi, eftir at nýggjar kanningar hjá Teknologisk Institutt hava víst, at gamli bankabygningurin í Steinatúni, har umleið 80 fólk av teimum umleið 150 fólkunum í miðfyrisitingini húsast, er í ringum standi. Bygningurin er illa fongdur av soppi. Bygningurin lekur illa og inniluftin er vánalig. Sambært galdandi ásetingum eiga ikki meira enn umleið 50 arbeiðspláss at vera í bygninginum í Steinatúni.

Tilmælini í nýggju kanningini frá Teknologisk Institutt av bygninginum í Steinatúni siga, at tað er ikki vandamikið hjá frískum fólki at vera í bygninginum. Støðan er annarleiðis fyri fólk, sum eru ovurviðkvom, hava astma ella aðrar sjúkur. Sambært tilmælunum frá Teknologisk Institutt eiga fólk, sum ivast, hvørt tey kunnu vera í bygninginum, venda sær til lækna við sínum spurningum. Nógv hava vent sær til lækna, sum hevur mælt fleiri av teimum frá at vera í bygninginum í Steinatúni.

Avgerð er tí tikin um at tøma bygningin í Steinatúni fyri starvsfólk skjótast gjørligt. Fíggjar- og KT-deildin flyta fyribil út í Mullers pakkhús, meðan tekniska fyrisitingin flytir út á 2. hædd í Sjóvinnuhúsinum, sum nú er tøk at gera klár at flyta inn í. Leigusáttmáli er undirskrivaður í við Tórshavnar Havn um at leiga 2. hædd í Sjóvinnuhúsinum.

Mett verður, at kostnaðurin fyri at flyta øll starvsfólkini úr Steinatúni út í Mullers pakkhús og Sjóvinnuhúsið kemur at kosta umleið 900 tús.kr. Hetta er íroknað hálvanannan mánaða leigu í 2025 av 2. hædd í Sjóvinnuhúsinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Leggjast fyri staðbundna nevnd** **Ja** ☐ **Nei** ☒

| | **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 799<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | | **Navn** |
| | | Framfluttum 2025 |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | | **Navn** | |
| 6110 | | Røkt og umvæling av bygningum | |

| **Upphædd** |
|---|
| 900.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin, tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla fíggjarnevndini til at taka undir við tilmælinum at játta 900 tús. kr. av meirinntøkum í 2024 á konto 6110 Røkt og umvæling av bygningum til flytingina av starvsfólkunum og deildunum í Steinatúni út í Mullers pakkhús og Sjóvinnuhúsið og beina málið víðari í býráði til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>20. november 2025 | Blað nr.: 800<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 256/25 Fleiri koyritímar til bussleiðina - 24/00552

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 256/25 | 25/00394-3 |

**Upprunin til málið**
Mál 24/00552

**Lýsing av málinum**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa málið fyri býráðið um at fáa Havnarvegin uppí bussleiðina.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
24/00552

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Býráðsfundur 20. november 2025:** málið varð umrøtt.

# 257/25 Umbøn um eykajáttan av meirinntøkum 2024 - 24/08061

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 203/25 | 25/10008-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 257/25 | 25/10008-1 |
| 3 Býráðsfundur | | | 25/10008-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna hevur góðar 13 mió. kr. eftir av meirinntøkum frá 2024.

**Lýsing av málinum**
Mælt verður til at brúka tær góðar 13 mió. kr. av meirinntøkunum frá 2024, sum enn ikki eru brúktar, soleiðis:

**1110 Tænastumannaeftirlønir:** Útreiðslurnar til tænastumannaeftirlønir eru ov lágt mettar í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025. Mett verður, at tað mangla 655 tús. kr. í fyri at halda játtanina í ár.

**2810 Fíggjarligt frípláss:** Útreiðslurnar til fíggjarligt frípláss eru ov lágt mettar í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025. Mett verður, at tað mangla 492 tús. kr. í fyri at halda játtanina í ár.

**3215 Forledragjaldið lækkað úr 27% niður í 25%:** Á býráðsfundin, 25. januar 2025, varð samtykt at lækka vøggustovugjaldið úr 27% niður í 25%. Kostnaðurin av at lækka vøggustovugjaldið varð mettur til 1,8 mió. kr., ið skuldi játtast sum eykajáttan á konto 3215 seinni í árinum, sí mál nr. 25/02002 Foreldragjaldið á dagstovnaøkinum.

**3212 Tímar vegna serligan tørv:** Gongdin seinastu árini hevur verið, at alsamt fleiri børn fáa játtan úr tímagrunninum.

**3218 Serstovur:** Lønarútreiðslurnar eru munandi øktar vegna stórar lønarhækkingar og lønarlyft.

**5110 Musikkskúlin:** Musikkskúlin hevur í nøkur ár drigið eitt rakstrarhall við sær yvir ár. Mælt verður til at dagføra játtanina, soleiðis at hetta hallið ikki verður flutt fram til 2026.

**5410 Býarbókasavnið:** Nýggja lógin um bókasøvn hevur við sær, at stuðulin frá landinum til kommunal bókasøvn fellur burtur. Tí koma 630 tús. kr. at mangla í rakstrinum hjá býarbókasavninum í ár.

**5610: Svimjihøllin:** Tað vísir seg nú, at kostnaðurin av at reka langhylin og alt tað nýggja virksemið í svimjihøllini var undirmettur í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025. Mett verður, nú ikki so nógv er eftir av árinum 2025, at kostnaðurin helst fer at vera umleið 800 tús. kr. hægri enn upprunaliga mett.

**6110 Fyribils flyting av starvsfólkunum í Steinatúni:** Mett verður, at tað kemur at kosta umleið 900 tús. kr. at flyta øll staarvsfólkini úr Steinatúni út í Mullers pakkhús og Sjóvinnuhúsið í ár. Her er leiga fyri hálvanannan mánaða til Tórshavnar Havn fyri 2. hædd av Sjóvinnuhúsinum í 2025 íroknað.

**8210 Feliri gøtuljós til innkomuvegin og tunnil:** Meir útreiðslur til gøtuljós og ljós til nýggja innkomuvegin og húsareynstunnilin verða mettar at kosta kontuni fyri gøtuljós umleið 500 tús. kr. meira í ár enn mett var í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025.

**20910 Meirinntøkur:** Mælt verður til at játta tilsamans 3,7 mió. kr. av meirinntøkum yvir á konto 20910 Aðrar inntøkur. Samlaða upphæddin á 3,7 mió. kr. er býtt sum í talvuni omanfyri. Víst verður til málini undir punktinum niðanfyri: “Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið”

| Deild | Navn | Upphædd |
|---|---|---|
| 1110 | Tænastumannaeftirlønir | 655.000 kr |
| 2810 | Fíggjarligt frípláss | 492.000 kr |
| 3215 | Foreldragjaldið lækkað niður í 25% | 1.800.000 kr |
| 3212 | Tímar vegna serligan tørv | 3.500.000 kr |
| 3218 | Serstovur | 800.000 kr |
| 5110 | Musikkskúlin | 400.000 kr |
| 5410 | Býarbókasavnið | 630.000 kr |
| 5610 | Svimjihøllin | 800.000 kr |
| 6110 | Fyribils flyting av starvsfólkunum í Steinatúni | 900.000 kr |
| 8210 | Fleiri gøtuljós til innkomuvegin og tunnil | 500.000 kr |
| 20910 | Skuld hjá sersambondum til ítróttaranlegg | 765.000 kr |
| 20910 | Rætting fíggjarviðurskifti hjá Ítróttaranlegg 2025 | 126.000 kr |
| 20910 | Niðurtøka av matr. nr. 192e í Kollafirði | 800.000 kr |
| 20919 | Avstemman av kreditorum | 800.000 kr |
| 20910 | Skuld Havnar Svimjifelag | 78.000 kr |
| | | **13.046.000 kr** |

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
25/02002 Foreldragjaldið á dagstovnaøkinum
25/08183 Skuld hjá sersambonum til ítróttaranlegg
25/05833 Fíggjarviðurskifti hjá ítróttaranlegg
25/09734 Fíggjarviðurskifti Svimjihøllin
25/08913 Sakarmál um ólógiliga bygging
25/09097 Hølisviðurskifti hjá fyrisitingini í Tórshavnar kommunu
25/09082 Avstemman av kreditorum

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
24/08061-1 Umbøn um eykajátta av meirinntøkum 2024
Meirinntøkur 30.09.2024
Yvirlit yvir játtan meirinntøkur

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 803<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☒ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | Upphædd |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | | **Navn** | **Deild** | | **Navn** | | **Upphædd** |
| | | Meirinntøkur 2025 | 1110 | | Tænastumannaeftirlønir | | 655.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 2810 | | Fíggajrligt frípláss | | 492.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 3215 | | Aðrar útreiðlsur | | 1.800.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 3212 | | Tímar til børn við serligum tørvi | | 3.500.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 3218 | | Serstovur | | 800.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 5110 | | Musikkskúlin | | 400.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 5410 | | Býarbókasavnið | | 630.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 5610 | | Svimjihøllin | | 800.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 6110 | | Røkt og umvæling av bygningum | | 900.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 8210 | | Gøuljós | | 500.000 |
| | | Meriinntøkur 2025 | 20910 | | Aðrar inntøkur | | 2.570.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við omanfyristandandi uppskoti til eykajáttan og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Heðin Mortensen, tekur undir við tilmælinum við broyting um at 2,57 mió. kr. verða settar av til konto 20910 aðrar inntøkur.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** atkvøtt vað um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

## 258/25 Eykajáttan av meirinntøkum 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.11.2025 | 215/25 | 25/09786-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 258/25 | 25/09786-1 |
| 3 Býráðsfundur | | | 25/09786-1 |

**Upprunin til málið**
Umsitingin ger á hvørjum ári dagførda inntøkumeting, sum verður løgd fyri býráðið við uppskoti um at raðfesta partar av møguligu meirinntøkunum til ymsar kontur, ið mettar vera at enda við meirnýtslu, sum ikki kann fíggjast á annan hátt, tá ið árið er úti.

**Lýsing av málinum**
Dagførda inntøkumetingin í november 2025, vísir, at samlaðu meirinntøkunar hjá Tórshavnar kommunu í 2025 vera umleið 80 mió. kr. hægri enn mett var í upprunaligu fíggjarætlanini hjá kommununi.

Mettu meirinntøkurnar í 2025 stava serliga frá hægri kommunuskatti, hægri felagsskatti og hægri skatti av eftirlønargjaldum.

Av meirinntøkunum á 80 mió. kr. er býráðið samt um at brúka tilsamans 52,5 mió. kr. av meirinntøkunum sum víst í talvuni niðanfyri. Hetta merkir samstundis, at Tórshavnar kommuna ikki fer at brúka tilsøgnina, um at taka lán fyri 17,2 mió. kr.

| Deild | Navn | Upphædd |
|---|---|---|
| 2375 | Tannlæknamiðstøð | 1.000.000 kr |
| 2775 | Ellisheimið, dagføring | 1.000.000 kr |
| 2775 | Dagføringar á eldraøkinum | 2.000.000 kr |
| 3175 | Náttúruspælipláss, Amerika | 1.300.000 kr |
| 4175 | Útbygging á skúlaøkinum | 5.000.000 kr |
| 5475 | Listasavnið, útbygging | 2.500.000 kr |
| 5775 | Oyggjaleikir, fjallasúklubreyt | 2.000.000 kr |
| 5775 | Oyggjaleikir, Tórsbreyt | 1.000.000 kr |
| 5775 | Svimjihøllin dagføring | 4.000.000 kr |
| 5370 | Knørrur | 5.500.000 kr |
| 7317 | Talgilding til borgaran | 1.400.000 kr |
| 6110 | Dagføring av bygningum | 6.600.000 kr |
| | Fíggjarligan lætta til barnafamiljur | 4.200.000 kr |
| 6575 | Kirkjugarðar | 4.500.000 kr |
| 6775 | Vatnveiting Eysturbýurin | 2.000.000 kr |
| 8375 | Brandbil og størri maskinur | 8.500.000 kr |
| | | **52.500.000 kr** |

**2375 Tannlæknamiðstøð:** Mælt verður til at játta 1 mió. kr. til at gera byggiskrá til nýggja tannlæknamiðstøð.

**2775 Ellisheimið**: Mælt verður til at játta 1 mió. kr. til dagføringar á Ellisheiminum.

**2775 Dagføringar á eldraøkinum:** Mælt verður til at játta 2 mió. kr. til tillagingar á Lágargarði. Av hesum fer 1,2 mió. kr. til konto 2775 L27015 Køkurin á Lágargarði, og góðar 800 tús. kr. fara til átøk at gera demensdeildirnar á Lágargarði meira demensvinarligar.

**3175 Náttúruspælipláss:** Mælt verður til at játta 1,3 mió. kr. til spælipláss í viðarlundini, sum verður brúkt av skúla, barnagørðum og familjum.

**4175 Útbygging á skúlaøkinum:** Tørvur er á útbyggingum á skúlaøkinum til komandi skúlaár, og mælt verður til at játta 5 mió. kr. av meirinntøkunum 2025 til hesar útbyggingar.

**5575 Listasavnið:** Mælt verður til at játta 2,5 mió. kr. av meirinntøkunum 2025 til útbyggingar av listasavninum.

**5775 Oyggjaleikir:** Mælt verður til at játta tilsamans 2 mió. kr. til fjallasúklubreyt umframt útbyggingar og tillagingar á Tórsbreyt til oyggjaleikirnar í 2027 av meirinntøkunum 2025.

**5775 Svimjihøllin:** Mælt verður til at játta 4 mió. kr. til at keypa nýggja reinsiskipan. Verandi skipan er gomul og slitin, hon megnar ikki at reinsa vatni í barnahylinum og halda hitan samstundis. Tí eru hyljarnir kaldari enn teir eiga at vera. Nýggj skipan skal tryggja, at vatni verður reinsað og heldur hitan. Hetta er fyrsta stigi av trimum at skifta reinsiskipan í gomlu hyljunum.

**5370 Stuðul til íløgur, Knørrur:** Fíggjarnevndin hevur samtykt at mæla býráðnum til at játta róðrarfelagnum Knørrur tilsamans 10, 8 mió. kr. í stuðli yvir tvey ár, sí mál nr. 25/02131 Umsókn um mentanarstuðul til róðrarfelagið Knørrur. Mælt verður til at stuðla Knørri við 5,5 mió. kr. av meirinntøkunum 2025.

**6110 Dagføring av bygningum:** Mælt verður til at játta 6,6 mió. kr. til dagføringar av kommunalum bygningum av meirinntøkunum 2025. henda játtanin verður býtt soleiðis:
- Sosialar íbúðir 1 mió. kr.
- Majaríið dagføringar 2,5 mió. kr.
- Vesið á vaglinum 1 mió. kr.
- Býlingshúsið í NH 1,1 mió.kr.
- Skúlar – matarskipan 1 mió. kr.

**xxxx Fíggjarligur lætti til barnafamiljur:** Mælt verður til, at barnafamiljur í Tórshavnar kommunu sleppa undan vøggu-, barnagarðs- og frítíðarskúlagjaldið í desember. Hetta verður mett at kosta kommununi 4,2 mió. kr., sum mælt verður til at fíggja av meirinntøkunum 2025.

**6575 Kirkjugarðar:** Mælt verður til at játta 4,5 mió. kr. til kirkjugarðar. Umleið 3,5 mió. kr. fer til at seta í verk víðkan av kirkjugarðinum í Kollafirði og 1 mió. kr. fer til at umgrava niðasta partin av nýggjast víðkanini av kirkjugarðinum við Velbastaðvegin. Her er tilfarið og tætt og leirkent. Neyðugt verður við nýggjum tilfari, sum er drenandi.

**6775 Vatnveiting:** Mælt verður til at játta 2 mió. kr. til minka um lekar og rust í rørunum til drekkivatn.

**8375 Rakstrargøgn:** Brandbilarnir og fleiri størri maskinur í Tórshavnar kommunu eru vorðnar rættiliga gamlar og dýrar í viðlíkahaldi. Ætlanin er at fara í holt við eina tilgongd at skifta út brandbilar og størri maskinur hesi komandi árini. Mælt verður til at uppraðfesta játtanina til rakstrargøgn við 8,5 mió. kr. av meirinntøkunum 2025, soleiðis at fyrstu bilrarnir kunnu bíleggjast nú. Ætlanin er at bíleggja ein nýggjan brandbil og ein nýggjan krókabil til brennistøðina beinanvegin.

**7317 Talgilding til borgaran:** Mælt verður til at játta 1,4 mió. kr. til KT-loysnir til byggimálsviðgerð. Verkætlanin snýr seg um at fara í holt við at nýta vitlíki í kommunalu málsviðgerðini. Verkætlnarfólk verður sett at eygleiða og greina málsviðerð innan byggimálsdeildina sum arbeiðsdømi, við atliti at fyrireika menning og íverksetan av vitlíki sum amboð í byggimálsviðgerð, ið síðan kann mennast víðari til málsviðgerð sum heild.

**Lógir, ásetingar o.a.**

| | Býráðsfundur<br>20. november 2025 | Blað nr.: 806<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
25/02131 Umsókn um mentanarstuðul til róðrarfelagið Knørrur
25/09594 Fjallasúkklubreyt til oyggjaleikir 2027

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | | **Navn** | **Deild** | | **Navn** | | **Upphædd** |
| | | Meirinntøkur 2025 | 2375 | | Tannrøkt | | 1.000.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 2775 | | Eldrarøkt | | 3.000.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 3175 | | Barnaansing | | 1.300.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 4175 | | Dagføring av skúlum | | 5.000.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 5575 | | Søvn og mentunararvur | | 9.500.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 5370 | | Knørrur | | 5.500.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 6110 | | Røkt og umvæling av bygningum | | 6.600.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | xxxx | | Barnafamiljur | | 4.200.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 6575 | | Kirkjugarðar | | 4.500.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 6775 | | Vatnveiting | | 2.000.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 8375 | | Rakstrargøgn | | 8.500.000 |
| | | Meirinntøkur 2025 | 7317 | | Talgilding til borgaran | | 1.400.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at taka undir við omanfyristandandi uppskoti til eykajáttan og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 19. november 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, atkvøður blankt og tekur støðu, tá málið kemur fyri býráðið.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Elsa Berg legði fram broytingaruppskot um at taka undir við tilmælinum við tí broyting, at 5 mió. kr.av meirinntøkunum 2025 verða lagdar afturat verkætlanini um útbygging á skúlaøkinum við lonum á skúlanum á Fløtum og skúlanum á Argjahamri.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

## 259/25 Fíggjarætlan 2026, Tórshavnar kommuna

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 129/25 | 25/06020-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.09.2025 | 163/25 | 25/06020-1 |
| 3 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 208/25 | 25/06020-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 01.10.2025 | 107/25 | 25/06020-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 02.10.2025 | 57/25 | 25/06020-1 |
| 6 Heilsu- og eldranevndin | 02.10.2025 | 22/25 | 25/06020-1 |
| 7 Vinnunevndin | 29.09.2025 | 26/25 | 25/06020-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.09.2025 | 141/25 | 25/06020-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 29.09.2025 | 62/25 | 25/06020-1 |
| 10 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 29.09.2025 | 62/25 | 25/06020-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 08.10.2025 | 176/25 | 25/06020-1 |
| 12 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 235/25 | 25/06020-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 19.11.2025 | 217/25 | 25/06020-1 |
| 14 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 259/25 | 25/06020-1 |

**Upprunin til málið**
Fíggjarnevndin skal sambært kommunustýrislógini leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið í seinasta lagi 1. oktober. Býráðið skal síðan viðgera uppskotið tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Hetta er ein sokallað teknisk framskriving av fíggjarætlanini 2025, sum er fyrsta stigið í sambandi við fyrireikingarnar og planleggingina av fíggjarætlanini 2026 hjá Tórshavnar Kommunu.

**Lýsing av málinum**
Tekniska framskrivingin av fíggjarætlanini 2025 er grundað á ta vitan og teir upplýsingar, ið eru tøkir í løtuni, og tekniska framskrivingin kann býtast upp í hesar tríggjar høvuðspartar:

1. Frakskriving av kommunuskattinum og skattinum av eftirlønargjøldunum.
2. Framskriving av rakstrarútreiðslunum.
3. Virksemisbroytingar eftir 1. desember 2024, tá fíggjarætlanin fyri 2025 varð samtykt.

**Ad. 1: Framskriving av kommunskattinum og skattinum av eftirlønargjøldum**
Búskaparráðið metir í várfrágreiðing sínari, frá apríl 2025, at føroyska bruttotjóðarúrtøkan, BTÚ, fer at vaksa 5,5% í ársins prísum í 2026. Í játtanarkørmunum hjá landinum, eisini frá apríl í ár, verða landsskattainntøkurnar framskrivaðar við 4,5% í 2026.

Eftir at Búskaparráðið gjørdi sínar metingar til várfrágreiðingina eru útlitini hjá alivinnuni versnaði. Søluprísurin er farin niður um framleiðslukostnaðin, samstundis sum tøkan og útboðið av laksi á altjóða

marknaðinum veksur. Í aðrar mátar valdar stór óvissa viðvíkjandi øllum búskaparligum forsøgnum, soleiðis sum støðan er í heiminum í løtuni.

Varisliga verður tí mett, at kommunuskatturin fer at vaksa 3,5% í 2026 samanborið við FÆ-2025.

Hetta er við óbroyttum skattaprosentið á 19% og óbroyttum barnafrádrátti á 9.000 kr.

Viðvíkjandi skattinum av eftirlønargjøldum, so metir Kommunufelagið, at skatturin av eftirlønargjøldum verður millum 5 og 10%, helst nærri 10%, hægri í 2026 enn í 2025. Varisliga verður tí mett, at skatturin av eftirlønargjøldum verður 5% hægri í 2026 samanborið við FÆ-2025.

**Ad 2: Framskriving av rakstrarútreiðslum**
Samlaðu rakstrarútreiðslurnar eru býttar sundur í lønir og rakstrarútreiðslur annars. Tað eru bert lønarútreiðslurnar av samlaðu rakstrarútreiðslunum, sum eru framskrivaðar í hesi fyrstu teknisku framskrivingini hjá kommununi. Lønirnar eru framskrivaðar við 3,25% frá FÆ-2025 til FÆ-2026. Hetta er sama framskriving av lønunum sum í játtanarkørmunum hjá landinum frá apríl í ár.

**Ad. 3: Virksemisbroytingar**
Virksemisbroytingarnar snúgva seg um lógarbroytingar og býráðssamtyktir eftir at fíggjarætlanin fyri 2025 varð samtykt umframt avleiddar broytingar í rakstrinum frá avhendaðum íløgum. Samanlagt kosta virksemisbroytingarnar, eftir at fíggjarætlanin fyri 2025 var samtykt, 17.187 t.kr. Størstu virksemisbroytingarnar stava frá øktum virksemi undir § 6, Teknisk mál, og hetta er serliga av nógv øktum avleiddum rakstrar virksemi, nú nýggi innkomuvegurin við íbindingum verður liðugur. Næst størsta virksemisbroytingin er á § 3, Børn og ung, 2.880 t.kr., og kemst hon av, at foreldragjaldið á dagstovnum varð lækkað úr 27% niður á 25% tíðliga í ár. Harumframt hava lógarreguleringar havt við sær fleiri rakstrarútreiðslur við sær á fólkaskúlaøkinum.

**Mett úrslit av rakstrinum í 2026 eftir tekniskar framskrivingar**
Í hesi fyrstu teknisku framskrivingini av FÆ-2025, sum er fyrsta grundarlagið undir fíggjarætlanini 2026 vaksa inntøkurnar 3,51% og rakstrarútreiðslurnar 4,02%. Í hesi fyrstu teknisku framskrivingini vaksa rakstrarútreiðslurnar sostatt meira enn mettu inntøkurnar. Tórshavnar Kommuna hevur vanliga sett sær sum innanhýsis mál, at rakstrarútreiðslurnar skulu vaksa minni enn mettu inntøkurnar.

Í hesi teknisku framskrivingini eru 245.187 t.kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur í 2026, tá ið Tórshavnar Havn er tikin burtur úr framskrivingini.

**Skjøl**
-Tíðarætlan Fíggjarætlan 2026
-Teknisk framskriving av FÆ-2025

**Tilmæli**
Kunnað verður um málið.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>20. november 2025 | Blað nr.: 810<br>Forkvinnunnar merki: |

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Fyrsta tekniska framskrivingin av rakstrinum til fíggjarætlanina 2026 varð løgd fyri fíggjarnevndina til kunningar tann 12. mai 2025. Síðan tá hevur umsitingin dagført búskaparmetingina og gjørt metingarnar neyvari við nýggjastu tølunum, sum eru tøk í løtuni. Nýggj inntøkumeting er gjørd. Lønarlistar umframt yvirlit yvir nýtt samtykt virksemi og lógarbroytingar eru dagførdar.

Sí talvuna niðanfyri til fíggjarætlan 2026.

| 1.000 kr. | | Roknskapur 2024 | Ætlan 2024 | Ætlan 2025 | Ætlan 2026 | Broyting 2025/2026 pct. | kr. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 1.090.759 | 1.011.886 | 1.099.983 | 1.143.982 | 4,00% | 43.999 |
| 20601 | Felagsskattur | 74.695 | 58.000 | 58.000 | 58.000 | 0,00% | 0 |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 1.079 | 1.000 | 1.000 | 2.000 | 100,0% | 1.000 |
| 20801 | Skattur af eftirlønaringjøldum | 220.513 | 209.753 | 231.376 | 265.000 | 14,5% | 33.624 |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 36.298 | 35.704 | 35.322 | 34.000 | -3,7% | -1.322 |
| 20804 | Kommunanna partur av Veiðigjaldi | 981 | 0 | 800 | 800 | 0,0% | 0 |
| 20805 | Kommunanna partur av Tøkugjaldi | 265 | 0 | 200 | 200 | 0,0% | 0 |
| | **Inntøkur íalt** | **1.424.591** | **1.316.343** | **1.426.681** | **1.503.982** | **5,4%** | **77.301** |
| **Rakstur** | | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 102.133 | 100.713 | 106.920 | 112.784 | 5,5% | 5.864 |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 334.724 | 321.960 | 354.202 | 369.086 | 4,2% | 14.884 |
| §3 | Børn og ung | 252.718 | 235.494 | 256.354 | 272.073 | 6,1% | 15.719 |
| §4 | Undirvísing | 56.784 | 56.538 | 57.753 | 62.466 | 8,2% | 4.713 |
| §5 | Mentan og frítíð | 79.324 | 70.350 | 81.001 | 83.036 | 2,5% | 2.035 |
| §6 | Teknisk mál | 164.446 | 156.688 | 167.051 | 174.969 | 4,7% | 7.918 |
| §7 | Kommunal virkir TK | 104.053 | 90.983 | 102.084 | 105.619 | 3,5% | 3.535 |
| | **Rakstur íalt uttan TH** | **1.094.182** | **1.032.726** | **1.125.365** | **1.180.033** | **4,9%** | **54.668** |
| §7 | Kommunal virkir TH | -36.939 | -36.939 | -36.985 | -37.975 | 2,7% | -990 |
| | **Rakstur íalt** | **1.057.243** | **995.787** | **1.088.380** | **1.142.058** | **4,9%** | **53.678** |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 34.039 | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 0,0% | 0 |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 2.140 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | 0 |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **36.178** | **32.000** | **32.000** | **32.000** | **0,0%** | **0** |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **331.169** | **288.556** | **306.301** | **329.925** | **7,7%** | **23.623** |
| **Rentur** | | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 6.141 | 13.217 | 10.962 | 8.867 | -19,1% | -2.095 |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 5.043 | 5.037 | 7.250 | 43,9% | 2.213 |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | 590 | 0 | 0 | 0 | 0,0% | 0 |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | 0 | 0 | 0 | 0,0% | |
| | **Rentur íalt** | **5.551** | **18.260** | **15.999** | **16.117** | **0,7%** | **118** |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **325.618** | **270.296** | **290.303** | **313.808** | **8,1%** | **23.505** |
| | **Avdráttir TK** | **15.900** | **23.033** | **22.733** | **20.003** | -12,0% | -2.730 |
| | **Avdráttir TH** | **14.484** | **15.873** | **15.874** | **15.873** | 0,0% | -1 |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **295.234** | **231.390** | **251.696** | **277.932** | **10,4%** | **26.236** |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **272.779** | **215.367** | **235.622** | **263.080** | **11,7%** | **27.458** |

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2026 er roknað við, at kommunuskattaprosentið er 19,00% og barnafrádrátturin er 9.000 kr., ið er tað sama sum í dag. Høvuðstølini í talvuni eru býtt á kommunugreinar.

Niðanfyri er greitt nærri frá grundarlagnum og fortreytunum fyri dagførdu framrokningunum.

**Dagførd meting av búskapargongdini**
Høvuðsniðurstøðunar í nýggjastu frágrieðingini hjá Búskaparráðnum, sum varð løgd fram tann 1. september, eru stórt sæð tær somu sum í várfrágreiðingini. Búskaparráðið metir nú, at vøksturini í BTÚ í árligum prísum verður nakað størri í 2026 enn mett var í várfrágreiðingini, men tað kemst av, at

Búskaparráðið hevur niðurskrivað metingina fyri vøksturin í 2025, tí laksaprísirnir eru lækkaðir meira enn væntað í ár. Tí verður metingin fyri búskaparvøksturin í leypandi prísum frá 2025 til 2026 tað størri.

Altjóða óvissan er framvegis stór, men renturnar eru lækkaðar og tað eru ikki útlit fyri, at rentunrnar hækka aftur í nærmastu framtíð. Tí er reallønin vaksin og útlit eru fyri størri vøkstri frameftir.

Gongdin og samansetingin av fólkatalinum í kommununi hevur grundleggjandi týdning fyri, hvussu kommunan skal útbyggjast og mennast frameftir.

Eingin dagførd fólkatalsframskriving er tøk í løtuni, men kommunan hevur gjørt eina meting av fólkatalinum fram til 2030. Metingin er lýst niðanfyri og eigur sjálvandi at vera tikin við neyðugum fyrivarni.

Tilflytingin til suðurstreymoyar øki hevur ligið um 150 persónar um árið tey seinastu 10 árini, men í fjør fluttu bert 48 persónar til suðurstreymoyar øki. Um tilflytingin fer at koma upp aftur á 150 og føðitíttleikin kemur upp aftur á 2,1, so væntar Búskaparráðið, at fólkatalið í Tórshavnar kommunu fer at vaksa stútt fram til 2030, tá ið tað væntandi fara at vera umleið 24.500 borgarar í Tórshavnar kommunu.

Um hugt verður nærri eftir fólkasamansetingini, so fer talið av børnum í barnagarðsaldri og í fólkaskúlunum at verða ættiliga støðugt í Tórshavnar kommunu frá 2026 og fram til 2030. Í mun til restina av landinum, so fer talið av teimum 25-44 ára gomlum at vaksa í Tórshavnar kommunu. Talið av pensjónistum fer at vaksa skjótari og fyrt tey, sum eru omanfyri 80 ár, fer talið at vaksa enn skjótari.

At talið av teimum eldru fer at vaksa lutfalsliga meira enn fólkatalið annars er ikki ein óvæntað niðurstøða í hesi framskrivingini hjá Búskaparráðnum. Í flestu londum verður sagt tað sama. Tað fara at verða lutfalsliga fleiri eldri samanborið við tey yngru komandi árini.

**Dagførd inntøkumeting**
Inntøkumetingin er dagførd við teimum upplýsingum og fortreytum, sum vórðu galdani í september 2025.

*Kommunuskattur*
Við støði í teimum upplýsingum og tí vitan, sum var tøk í september 2025, verður kommunuskatturin mettur at hækka 4% frá 2025 til 2026. Kommuskatturin hækkar sostatt úr 1.099.983 t.kr. í FÆ-2025 upp í 1.143.982 t.kr. í hesum uppskotinum.

*Húsaleiguskattur*
Við støði í gongdini í inntøkunum frá húsaleiguskattinum í ár verður mett, at húsaleiguskatturin fer at verða 2 mió. kr. í 2026. Í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025 varð húsaleiguskatturin settur til 1 mió. kr. Húsaleiguskatturin verður sostatt 1 mió. kr. hægri í hesum uppskotinum samanborið við FÆ-2025.

*Felagsskattur*
Í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025 varð búskettarað við 58 mió. kr. í felagsskatti. Av tí, at inntøkurnar frá felagsskattinum hava víst seg at kunna sveiggja nógv frá ári til ár, verður búsketterað við somu inntøkum frá felagsskattinum í 2026, sum upprunaliga varð búsketterað við í FÆ-2025.

*Skattur av eftirlønargjøldum*
Í dagførdu metingini verður mett, at skatturin av eftirlønargjøldum fer at verða munandi hægri í bæði 2025 og 2026 enn upprunaliga mett. Hetta kemst serliga av stóru lønarhækkingunum í hesum sáttmalaskeiðnum. Eftirlønarskatturin fer tí úr 231.376 t.kr. í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025 upp í 265.000 t.kr. í hesum uppskotinum til fíggjarætlan 2026.

*Veiðigjald*
Fyrstu ferð komunurnar fingu part av veiðigjaldinum var í 2025, og mett var, at Tórshavnar kommuna fer at fáa 800 t. kr. í veiðigjaldi í ár. Mett verður, at Tórshavnar kommuna fer at fáa á leið somum upphædd í 2026.

*Tøkugjald*
Fyrstu ferð komunurnar fingu part av tøkugjadinum var í 2025, og mett var, at Tórshavnar kommuna fer at fáa 200 t. kr. í tøkugjaldi í ár. Mett verður, at Tórshavnar kommuna fer at fáa á leið somum upphædd í 2026.

*DIS, FAS og frádráttir*
Inntøkurnar á hesi kontuni vera mettar at fara at verða eitt vet minni í 2026 enn í upprunaligu fíggjarætlanini í 2025. Inntøkurnar verða mettar til 34.000 t.kr. í hesum uppskotinum til fíggjarætlan 2026 í mun til góðar 35.000 t.kr. í FÆ-2025.

*Samlaðu inntøkurnar*
Samanlagt hækka inntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu tí 5,4% í hesum uppskotinum samanborið við FÆ-2025.

**Rakstrarútreiðlsur**
Vanliga mannagongdin í uppskotinum til fíggjarætlan er, at samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum skal liggja innanfyri karmin av metta vøkstrinum av samlaðu inntøkunum. Hetta merkir, at í hesum uppskotinum eigur vøksturin í samlaðu rakstrarútreiðslunum í mesta lagi at vera 5,4%.

í hesum uppskotinum til fíggjarætlan 2026 er samlaði vøksturin í rakstrarútreiðslunum 4,9%.

Munandi partur av samlaðu rakstrarútreiðslunum eru lønarútreiðslur. Samlaði lønarvøksturin var stórur frá 2024 til 2025. Hetta komst fyrst og fremst av stórum vøkstri í sáttmálalønunum á føroyska arbeiðsmarknaðinum, men løgtingssamtyktin um lønarlyft til ávísar fakfelagsbólkar hevði eisini sína ávirkan á vøksturin í lønarútreiðslunum hjá kommununi í 2025.

Flestu sáttmálarnir við tey stóru føroysku fakfeløgini ganga út í 2026, tá ið nýggir sáttmálar skulu gerast fyri tey komandi tvey árini. Hetta, saman við tí, at renturnar og prísvøksturin er lægri nú enn tá verandi sáttmálar á arbeiðsmarknaðinum vórðu gjørdir, benda á, at vøksturin í samlaðu lønarútreiðslunum hjá kommununi ikki verður líka stórur í 2026 sum í 2025.

Niðanfyri er í stuttum greitt frá broytingunum í rakstrinum á ymsu greinunum í fíggjarætlanini 2026.

**§ 1 Kommunal fyrisiting:**
Á grein 1 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 5,5%, svarandi til góðar 5,8 mió. kr. Broytingin er í høvuðsheitum broytingar í sáttmálalønum. Harumframt fer ein góð 1 mió. kr. til løgtingsvalið og fólkatingsvalið, sum vera í 2026.

**§ 2 Almanna- og heilsumál:**
Á grein 2 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 4,2%, svarandi til smáar 15 mió. kr. Eldraøkið er framskrivað við sama virksemi sum í dag og bert lønarhækkanir eru lagdar afturat. Tilhaldið í Tórsgøtu er flutt á egið rakstrarstað 2740 Tilhaldið í Tórsgøtu frá ávikavist 2720 Heilsuhúsið (rakstur) og 2722 Tilboð (lønir og brúkaragjøld).

Sosiala deild hækkar nakað. Framskrivingin er við sama virksemi sum í dag, men har eru nøkur gjøld løgd inn fyri foreldraførleikakanningar og arbeiðsroyndir til tey ungu. Somuleiðis eru nøkur tænastugjøld hækka so sum vistarhald og fundarsamsýningar til barnaverndarnevndina.

**§ 3 Børn og ung:**
Á grein 3 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 6,1%, svarandi til 15,7 mió. kr. Á hesi greinini er tað serliga barnatalið, sum stýrir játtanini. Í 2026 fer vøksturin í rakstrinum serliga til, at stovnsgjaldið fyri vøggustovubørn verður óbroytt í 2026 í mun til 2025, umframt annan vøkstur í rakstrinum av stovnunum og leigugjøldum. Somuleiðis er starvsaldurin fyri námsfrøðingar hækkaður eitt lønartrin og leiðslan er tikin úr normeringini.

**§ 4 Undirvísing:**
Á grein 4 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 8,2%, svarandi til 4,7 mió. kr. Á hesi greinini er tað talið av børnum og ungum í fólkaskúlunum, sum stýra játtanini. Munandi partur av vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum fara til Skúlan á Fløtum, Eysturskúlan, Sankta Frans skúla, Skúlan á Argjahamri og Skúlan við Løgmannabreyt.Talan er um stóran árgang. Ein eyka 1. flokk í Sankta Frans skúla og ein forskúla á Argjahamri. Hartil er gjald fyri heildartilboð á skúlanum á Trøðni stórur parturin av vøkstrinum á grein 4, t.e. er konta 4142, sum kostar 2 mió. kr. eyka í 2026.

**§ 5: Mentan og frítíð:**
Á grein 5 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 2,5%, svarandi til 2 mió. kr. Nýggja svimjihøllin við langhyli í Gundadali fer við størsta partinum av vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum á mentanar og frítíðarøkinum í 2026. Harnæst er tað ítrottaranlegg og býarbókasavn, sum hava við sær ein vøkstur í rakstrarútreiðslunum.

Fyri flestu stovnarnar er sama virksemi framskrivað. Bókasavnið hevur mist stóran part av stuðlinum frá landinum í sambandi við nýggju bókasavnslógina. Fyri svimjihøllina verður mett, at talið av ársverkum liggur á einum nøktandi støði. Inntøkugrudnarlagi hjá Ítróttarannlegg er munandi versna síðan við Tjarnir lat upp, hartil eru nýggj høll í Kaldbakk latin upp. Samlað ávirkar hetta raksturin við áleið 1,5 mió. kr.

**§ 6: Teknisk mál:**
Á grein 6 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 4,7%, svarandi til smáar 8 mió.

Infrakervið í Tórshavnar kommunu er útbygt munandi seinastu árini, t.d. Havnavegurin, tilhoyrandi tunnilin og stóru útskykkingarnar í Argjahaganum og í Hoyvíkshaganum. Hetta merkir øktar viðlíkahaldskostnaðir fyri kommununa.

Útrokningar vísa, at um allir hesir viðlíkahaldskostnaðir til m.a. vatnveiting, kloakkir, vegir, reinhald, asfalt, kavarudding og gøtuljós vórðu innførdir í einum, hevði tað kosta 9,9 mió. kr. Í staðin verður hesin viðlíkahaldskostnaður innførdur so líðandi, soleiðis at kostnaðurin fyri 2026 verður 3,6 mió. kr.

Útreiðslurnar til røkt av bygningum, fríðkan og viðlíkahald, røkt av kirkjugørðum og verkstaðið hjá kommununi vaksa millum 4 og 5%, mest orsaka av lønarvøkstri og príshækkingum annars.

**§ 7: Kommunal virkir:**
Á grein 7 hækkar samlaða rakstrarjáttanin í 2026 við 3,5%, svarandi til 3,5 mió.

Á grein 7 verður mett, at netto rakstrarinntøkurnar hjá Tórshavnar kommunu frá Tórshavnar havn fara at verða umleið 1 mió. kr. hægri í 2026 enn tær vóru í 2025. Umleið 38 mió. kr. í 2026 samanborið við 37 mió. kr. í 2025.

Kommunala brennistøðin kemur at kosta Tórshavnar kommunu 4,7% meira í rakstri í 2026 enn í 2025, og brandstøðin kemur at kosta 6,2% meira í rakstri í 2026 enn í 2025.

**Skattafíggjaðar íløgur**
Í hesum uppskotinum eru góðar 263 mió. kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur. Tórshavnar kommuna er farin undir at byggja nýtt Røktarheim á Stórubrekku, tí fer størsti parturin av íløguætlanini komandi ár til almanna og heilsumál. Íløgur verða somuleiðis gjørdar í børn og ung, og undirvísing. Peningur verður settur av til Oyggjaleikir 2027. Innan tekniska øki verða størstu íløgurnar m.a. gjørdar í átøk innan orku og umhvørvið, kloakk og spillivatnsætlan, og renovatión.

**Tilmæli:**
Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið innan 1. oktober.

Býráðið skal viðgera uppskotið til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. Stjórnin mælir fíggjarnevndini til at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Fíggjarnevndin 17. september 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Framlagt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2025:** Framlagt.

**Tekniska nevnd 29. september 2025:** Framlagt.

**Vinnunevndin 29. september 2025:** Framlagt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 29. september 2025:** Framlagt

**Mentamálanevndin 01. oktober 2025:** Framlagt.

**Trivnaðarnevndin 02. oktober 2025:** Framlagt.

**Heilsu- og eldranevndin 02. oktober 2025:** Framlagt.

**Fíggjarnevndin 08. oktober 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlan og beina málið í býráðið til fyrstu viðgerð.

Ein minniluti, Birgir Nielsen, tekur ikki undir við fyriliggjandi uppskoti, men mælir til at ávikavist hækka barnafrádráttin og/ella lækka kommunuskattin.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Málið varð samtykt við fyrstu viðgerð við átta atkvøðum fyri, tveimum ímóti og trimum blonkum

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk, Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Blankt atkvøddu: Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Sunnvá Dahl Høgfeldt.

Málið beint til aðru viðgerð.

**Ískoyti:** Í hesum broytingaruppskotinum til upprunaliga uppskotið til fíggjarætlan 2026 vísa dagførdu inntøkumetingarnar seg at verða smáar 15 mió. kr. hægri enn í upprunaligu fíggjarætlanini. Vøksturin

stavar frá hægri meting av inntøkuskattinum, og samlaði vøksturin í inntøkunum í 2026 er nú 6,4% hægri enn í upprunaligu fíggjarætlanini fyri 2025.

Tað eru eisini gjørdar ymsar broytingar og tillagingar í rakstrinum, sum samanlagt geva eina hækking í rakstrinum á 745 tús. kr. í mun til upprunaliga framlagda fíggjarlógaruppskotið fyri 2026. Samlaði vøksturin í rakstrinum, uttan Tórshavnar Havn, er framvegis 4,9% í mun til upprunaliga fíggjarætlanina 2025.

Í hesum broytta uppskotinum til fíggjarætlan 2026 eru 277 mió. kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur.

Samlaðu broytingarnar, íløguætlanin og úrslitið hjá Tórshavnar kommunu, íroknað Tórshavnar havn, eru vístar í talvunum niðanfyri.

| Konto | Nýggjar inntøkumetingar | 2026 |
|---|---|---|
| **§ 20** | **Inntøkur** | **14.574** |
| 20501 | Kommunuskattur | 14.574 |

| Konto | Sparingar og tiltøk (tús. kr.) | 2026 |
|---|---|---|
| **§ 1** | **Kommunal fyrisiting** | **710** |
| 1310 | Býráðsskrivstova | 10 |
| 1311 | Miðfyrisiting | 500 |
| 1315-13151 | Nevndir og ráð – Eldraráðið | 200 |
| **§ 2** | **Almanna- og heilsumál** | **3.750** |
| 2101 | Hvíldarheimið Naina | 250 |
| 2210 | Kommunulæknatænastur | 100 |
| 2461 | Stuðul til verkætlanir innan heilsu- og eldramál | 350 |
| 2612 | Stuðulsfyriskipanir burtur frá 1:1 fyrisskipan | 300 |
| 2720 | Heilsuhúsið, keyp av vørum og tænastum | 150 |
| 2720 | Heilsuhúsið (Virkis- og venjingarstovan á Lágargarði) | 100 |
| 2722 | Gjøld fyri tilboð, umlætting | 60 |
| 2722 | Gjøld fyri tilboð, onnur brúkaragjøld | 75 |
| 2731 | Gjøld fyri røktartænastur, búpláss | 810 |
| 2731 | Gjøld fyri røktartænastur, heimahjálp | 40 |
| 2740 | Tilhaldið í Tórsgøtu | 40 |
| 2750 | Ansingarsamsýning | 500 |
| 2755 | Útleiga pláss til onnur eldrasamstørv ella til Almannaverkið | 975 |
| **§ 3** | **Børn og ung** | **3.545** |
| 3215 | Samla fyrisitingina í Børn og Ung í kommunalum bygningi | 250 |
| 3215 | Umskipa partar av 3. flokstilboði | 500 |
| 3215 | Útboð av vørum og tænastum innan B&U | 150 |
| 3104 | Eind R, seinking at lata upp nýggja partin av dagst. á Hamrinum | 1.545 |
| 3215 | Leiga í Hoydalar (lonir) | 1.100 |
| **§ 4** | **Undirvísing** | **1.500** |
| 4142 | Skúlin á Trøðni, lægri barnatal í heildartilboði | 1.500 |
| **§ 5** | **Mentan og frítíð** | **260** |
| 5314 | Mullers Pakkhús | 100 |
| 5510 | Tórshavnar Býarsavn | 160 |

| | | |
|---|---|---|
| **§ 6** | **Teknisk mál** | **7.025** |
| 6109 | Umsting av bygningum | 95 |
| 6110 | Røkt og umvæling av bygningum | 1.100 |
| 6111 | Leiga traðir og økir | 100 |
| 6212 | Fríðkan og viðlíkahald, Ledisliðið | 500 |
| 6510 | Kirkjugarðar | 500 |
| 8112 | Asfalt | 250 |
| 8210 | Gøtuljós | 800 |
| 8310 | Verkstaðið | 680 |
| 6110 | Gjald fyri tómar bústaðir uml. 477 bústaðir | 2.900 |
| 6110 | Lækka hitan niður 21 stig í kommunalum bygningum | 100 |
| **§ 7** | **Kommunal virki** | **1.000** |
| 7260 | Stuðul til bjargingarfeløg | 400 |
| 7315 | Kommunuætlanin | 600 |
| | **Sparingar og tiltøk tilsamans** | **17.790** |

| **Konto** | **Uppraðfestingar (tús. kr.)** | **2026** |
|---|---|---|
| | **§ 1 Kommunal fyrisiting** | **950** |
| 1315-13150 | Nevndir og ráð - Ungdómsráð | 150 |
| 1315-13152 | Borgarating | 150 |
| 1313 | Býarskipanardeildin | 400 |
| 1313 | Umhvørvisdeildin | 250 |
| | **§ 2 Almanna- og heilsumál** | **5.400** |
| 2722 | Kommunal demenssamskipan | 400 |
| 2614 | Familjuráðgevi til sosialu deild | 400 |
| 2720 | Útbúgving av heilsufakfólki | 2.000 |
| 2721 | Røktartænastur | 2.600 |
| | **§ 3 Børn og ung** | **7.550** |
| 3215 | Minka barnabólkar (3102-3106) | 5.800 |
| 3217 | Serøkið, dygdarmennara + meirjáttan | 1.750 |
| | **§ 4 Undirvísing** | **500** |
| 4140 | Matarskipan | 500 |
| | **§ 5 Mentan og frítíð** | **950** |
| 5371 | Rakstrarstuðul FMA | 360 |
| 5610 | Betri upplatingartíðir, svimjihøllin í Gundadali | 80 |
| 5312 | Hoydalar, leiga | 510 |
| | **§ 6 Teknisk mál** | **2.885** |
| 6110 | Røkt og umvæling av bygningum | 1.000 |
| 6110 | Leiga, sjóvinnuhúsið | 1.385 |
| 6210 | Fríðkan av býnum | 500 |
| | **§ 7 Kommunal virki** | **300** |
| 7711 | Visit Tórshavn | 300 |
| | **Uppraðfestingar tilsamans** | **18.535** |

Við broytingaruppskotinum omanfyri verður uppskotið til fíggjarætlan 2026 soljóðandi:

| | | Roknskapur | Ætlan | Ætlan | Ætlan | Broyting 2025/2026 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1.000 kr. | | 2024 | 2024 | 2025 | 2026 | pct. | kr. |
| | | | | | | | |
| **Inntøkur** | | | | | | | |
| 20501 | Kommunuskattur | 1.090.759 | 1.011.886 | 1.099.983 | 1.158.556 | 5,32% | 58.573 |
| 20601 | Felagsskattur | 74.695 | 58.000 | 58.000 | 58.000 | 0,00% | 0 |
| 20502 | Húsaleiguskattur | 1.079 | 1.000 | 1.000 | 2.000 | 100,0% | 1.000 |
| 20801 | Skattur af eftirlønarinngjøldum | 220.513 | 209.753 | 231.376 | 265.000 | 14,5% | 33.624 |
| 20802 | DIS, FAS og frádráttir | 36.298 | 35.704 | 35.322 | 34.000 | -3,7% | -1.322 |
| 20804 | Kommunanna partur av Veiðigjaldi | 981 | 0 | 800 | 800 | 0,0% | 0 |
| 20805 | Kommunanna partur av Tøkugjaldi | 265 | 0 | 200 | 200 | 0,0% | 0 |
| | **Inntøkur íalt** | **1.424.591** | **1.316.343** | **1.426.681** | **1.518.556** | **6,4%** | **91.875** |
| | | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | | |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 102.133 | 100.713 | 106.920 | 113.023 | 5,7% | 6.103 |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 334.724 | 321.960 | 354.202 | 370.739 | 4,7% | 16.537 |
| §3 | Børn og ung | 252.718 | 235.494 | 256.354 | 276.078 | 7,7% | 19.724 |
| §4 | Undirvísing | 56.784 | 56.538 | 57.753 | 61.466 | 6,4% | 3.713 |
| §5 | Mentan og frítíð | 79.324 | 70.350 | 81.001 | 83.726 | 3,4% | 2.725 |
| §6 | Teknisk mál | 164.446 | 156.688 | 167.051 | 170.829 | 2,3% | 3.778 |
| §7 | Kommunal virkir TK | 104.053 | 90.983 | 102.084 | 104.919 | 2,8% | 2.835 |
| | **Rakstur íalt uttan TH** | **1.094.182** | **1.032.726** | **1.125.365** | **1.180.775** | **4,9%** | **55.410** |
| §7 | Kommunal virkir TH | -36.939 | -36.939 | -36.985 | -37.975 | 2,7% | -990 |
| | **Rakstur íalt** | **1.057.243** | **995.787** | **1.088.380** | **1.142.800** | **5,0%** | **54.420** |
| | | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | | |
| 20101 | Stuðul til rentuútreiðslur | 34.039 | 30.000 | 30.000 | 30.000 | 0,0% | 0 |
| 20910 | Aðrar inntøkur | 2.140 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | 0 |
| | **Aðrar útreiðslur íalt** | **36.178** | **32.000** | **32.000** | **32.000** | **0,0%** | **0** |
| | | | | | | | |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **331.169** | **288.556** | **306.301** | **343.757** | **12,2%** | **37.455** |
| | | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur TK | 6.141 | 13.217 | 10.962 | 8.867 | -19,1% | -2.095 |
| 20301 | Rentuútreiðslur TH | | 5.043 | 5.037 | 7.250 | 43,9% | 2.213 |
| 20401 | Rentuinntøkur TK | 590 | 0 | 0 | 0 | 0,0% | 0 |
| 20401 | Rentuinntøkur TH | | 0 | 0 | 0 | 0,0% | |
| | **Rentur íalt** | **5.551** | **18.260** | **15.999** | **16.117** | **0,7%** | **118** |
| | | | | | | | |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **325.618** | **270.296** | **290.303** | **327.640** | **12,9%** | **37.337** |
| | | | | | | | |
| | | | | | | | |
| | **Avdráttir TK** | **15.900** | **23.033** | **22.733** | **20.003** | -12,0% | -2.730 |
| | **Avdráttir TH** | **14.484** | **15.873** | **15.874** | **15.873** | 0,0% | -1 |
| | **Úrslit av rakstri TK/TH** | **295.234** | **231.390** | **251.696** | **291.764** | **15,9%** | **40.068** |
| | | | | | | | |
| | **Avlop til skattafíggjaðar íløgur hjá TK*** | **272.779** | **215.367** | **235.622** | **276.912** | **17,5%** | **41.290** |
| | | | | | | | |

Í broytta uppskotinum eru 277 mió. kr. eftir til skattafíggjaðar íløgur, sum verða býttar soleiðis:

| Deild | Løgukarmur | | FÆ2026 |
|---|---|---|---|
| **§2** | | **Almanna- og heilsumál** | **153.000** |
| 2775 | LK27012 | Nýtt røktarheim við røktaríbúðum | 147.000 |
| 2775 | LK27013 | Eldradepil í Kollafirði | 6.000 |
| **§3** | | **Børn og ung** | **11.000** |
| 3175 | LK31020 | Dagstovna, frítíðarskúla og ungdómstilboð | 3.000 |
| 3175 | LK31020 | Tillagingar á dagstovnaøkinum | 8.000 |
| **§4** | | **Undirvísing** | **17.500** |
| 4175 | LK41013 | Dagføring, Hoyvíkar skúli | 5.500 |
| 4175 | | Dagføring av skúlum og spæliplássum | 4.000 |
| 4175 | | Heildarumvæling av Argja skúla | 8.000 |
| **§5** | | **Mentan og frítíð** | **8.500** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | 5175 LK51001 | Musikkskúli | 3.500 |
| | 5775 LK57049 | Oyggjaleikir 2027 | 5.000 |
| **§6** | | **Teknisk mál** | **72.000** |
| | 6177 LK61705 | Íløgur í orku og umhvørvisátøk | 20.000 |
| | 6275 | Trivnaðarøki Kollafjørður | 9.000 |
| | 6275 | Lendisætlan | 1.000 |
| | 6275 LK62998 | Fríðkan, bygdir og øki | 5.000 |
| | 6275 LK62999 | Fríðkan av býnum | 5.000 |
| | 6875 LK68999 | Kloakk, spillivatnsætlan | 21.000 |
| | 8175 LK81999 | Vegaverkætlanir | 8.000 |
| | 8175 LK81061 | Gongu- og súklubreytir og atkoma | 3.000 |
| **§7** | | **Kommunal virki** | **15.000** |
| | 7175 LK71999 | Renovatión | 15.000 |
| | | **Samanlagt TK** | **277.000** |
| | 7475 | Tórshavnar havn | 60.000 |
| | | **Samanlagt** | **337.000** |

Tá ið virksemið hjá Tórshavnar Havn verður tikið við í samlaðu fíggjarætlanina hjá Tórshavnar kommunu í 2026, gevur samlaða fíggjarætlanin eitt hall á 9,3 mió. kr.

Høvuðsyvirlit **2026**

| | | Rakstraræetlan | | Løguætlan |
|---|---|---|---|---|
| Túsund kr. | | Útreiðslur | Inntøkur | Útreiðslur |
| **§ 1.** | **Kommunal fyrisiting** | **113.022** | **-** | **-** |
| | *11. Felagsútreiðslur* | *109.119* | *-* | *-* |
| | *18. Almenn starvsfólk v.m.* | *3.903* | *-* | *-* |
| **§ 2.** | **Almanna- og heilsumál** | **371.714** | **975** | **153.000** |
| | *20. Heilsumál* | *28.655* | *-* | *-* |
| | *21. Almannamál* | *343.059* | *975* | *153.000* |
| **§ 3.** | **Børn og ung** | **276.077** | **-** | **11.000** |
| | *24. Mentan* | *12.450* | *-* | *-* |
| | *26. Barnaansing* | *263.627* | *-* | *11.000* |
| **§ 4.** | **Undirvísing** | **61.464** | **-** | **17.500** |
| | *23. Útbúgving og gransking* | *61.464* | *-* | *17.500* |
| **§ 5.** | **Mentan og frítíð** | **83.726** | **-** | **8.500** |
| | *23. Útbúgving og gransking* | *19.097* | *-* | *3.500* |
| | *24. Mentan* | *64.629* | *-* | *5.000* |
| **§ 6.** | **Teknisk mál** | **170.827** | **-** | **72.000** |
| | *11. Felagsútreiðslur* | *79.316* | *-* | *40.000* |
| | *24. Mentan* | *6.402* | *-* | *-* |
| | *30. Umhvørvi* | *26.494* | *-* | *21.000* |
| | *38. Samferðsla og samskifti* | *58.615* | *-* | *11.000* |
| **§ 7.** | **Kommunal virki** | **66.944** | **-** | **75.000** |
| | *30. Umhvørvi* | *37.472* | *-* | *15.000* |
| | *31. Tilbúgving* | *13.641* | *-* | *-* |
| | *37. Handil og vinna annars* | *7.283* | *-* | *-* |
| | *38. Samferðsla og samskifti* | *8.548* | *-* | *60.000* |
| | **Tilsamans** | **1.143.774** | **975** | **337.000** |
| § 20. | 22. Íbúðarmál | 30.000 | - | - |
| § 20. | 50. Rentur | 16.117 | - | - |
| § 20. | 52. Skattir og avgjøld | 2.000 | 1.518.556 | - |
| Tilsamans | | 1.191.891 | 1.519.531 | 337.000 |
| Yvirskot | | - | 327.640 | - |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | | **-** | **-9.360** | **-** |
| § 25. | 60. Broytingar í virði og skuld v.m. | - | 88 | - |
| **Nettokassaúrslit** | | **-** | **-9.272** | **-9.272** |
| § 25. | 62. Afturgjald av skuld | 35.876 | - | -35.876 |
| **Bruttokassaúrslit** | | **-** | **-** | **-45.148** |
| § 25. | 64. Útvegan av gjaldføri | - | 45.148 | - |
| Samanlagt | | 35.876 | 35.876 | - |

**Fíggjarnevndin 19. november 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Høgni Vilhelmsen, atkvøður blankt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í allari viðgerðini.

**Býráðsfundur 20. november 2025:**

Anja Weyhe vegna Elsu Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annitu á Fríðriksmørk, Berg Robert Dam Jensen og Kristionnu Winther Pouen, Guttorm í Skála og Annfinn Brekkstein, skjýtur upp, at 1 mió. kr. verður flutt av 6275 LK62999 til 8175 vegagerð Gerðisbreyt og Kaldbak.

Atkvøtt varð um broytingarppskotið, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og ongum blonkum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Annfinn Brekkstein, Birgir Nielsen og Høgni Vilhelmsen

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen

Birgir Nielsen legði fram broytingaruppskot um at hækka barnafrádráttin við 1000 kr og at fíggja hesar 5,6 mió. kr. av konto 6177, sum er umsiting og røkt av bygningum, Orkuátøk.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við átta atkvøðum ímóti, fimm atkvøðum fyri og ongum blonkum atkvøðum.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen og Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Birgir Nielsen fram eitt annað broytingaruppskot um at lækka kommunuskattin 0,25%, svarandi til 16,25 mió. kr. sum skal fíggjast av somu konto 6177, Orkuátøk.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við átta atkvøðum ímóti, fimm atkvøðum ímóti og ongum blonkum atkvøðum.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen og Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Birgir Nielsen legði fram triðja broytingaruppskot um at økja íløgustuðulin til Felagshús hjá FC Hoyvík við 5 mió. kr, fíggjað av konto 6177, Orkuátøk.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið fall við átta atkvøðum ímóti, fimm atkvøðum fyri og ongum Blonkum atkvøðum.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttorm í Skála.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Endaliga varð atkvøtt um fíggjarætlanina 2026, sum broytt við fyrsta broytingaruppskotinum, ið bleiv samtykt við ellivu atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttorm í Skála, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

| | Býráðsfundur<br>20. november 2025 | Blað nr.: 821<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 260/25 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 38/25 | 25/00161-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 64/25 | 25/00161-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.03.2025 | 58/25 | 25/00161-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 90/25 | 25/00161-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2025 | 85/25 | 25/00161-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 118/25 | 25/00161-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 98/25 | 25/00161-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 12.06.2025 | 130/25 | 25/00161-1 |
| 9 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 175/25 | 25/00161-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 17.09.2025 | 166/25 | 25/00161-1 |
| 11 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 209/25 | 25/00161-1 |
| 12 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 236/25 | 25/00161-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 12.11.2025 | 208/25 | 25/00161-1 |
| 14 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 260/25 | 25/00161-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Framlagt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2025:** Fremlagt.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri juni og juli verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. september 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Mánaðarroknskapurin fyri august 2025 er um teldupost 18. september 2025 sendur fíggjarnevndarlimunum til góðkenningar.

Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen hava góðkent roknskapin.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri september verður lagdur fram á fundinum.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 12. november 2025:** Framlagt.

**Býráðsfundur 20. november 2025:** Framlagt.

# 261/25 Bústaðarbygging í Norðreki í Kollafirði, matr. nr. 313a - 23/02421

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.11.2025 | 157/25 | 25/03549-3 |
| 2 Tekniska nevnd | 03.11.2025 | 67/25 | 25/03549-3 |
| 3 Býráðsfundur | 20.11.2025 | 261/25 | 25/03549-3 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til upprunaligu málslýsingina fyri mál nr. 23/02421, Framtíðar byggilendi í Kollafirði, sí j. nr. *25/03549-2, Upprunalig málslýsing_mál nr. 23/02421_Framtíðar byggilendi í Kollafirði*.

Málið byrjaði upprunaliga við, at borgarar vístu sína ónøgd við, at bygdin manglaði bústaðir, og at ung fólk ikki høvdu møguleika fyri at seta búgv í bygdini.

**Lýsing av málinum**
Í tilgongdini hevur verið arbeitt við at samráðast við Búnaðarstovuna og festara um lendi í Norðreki, matr. nr. 313a.

Avtalað varð í desember 2023 gjørd við festaran Gunvør Dam Jensen um lendi, og er eitt krav í avtaluni, at kommunan endurrindaði fyri seyðahúsið á matrikklinum. Fleiri mátar eru at náa hesum kravinum, men av tí at tað ikki hevur verið púra greitt, hvar atkoman til økið skal verða, so er eingin endaliga avgerð tikin um júst hetta kravið. Tað verður ikki mett ráðiligt at endurrinda seyðahúsið, fyrr enn tað er heilt vist, hvussu atkoman til lendið verður og farið verður undir at planleggja ítøkiligu bygginginа.

So statt hevur tað verið týdningarmikið fyri umsitingina at fáa neyðugu atkomuna til lendið. Samráðingar hava verið við eigararnar av matr. nr. 159, 80a um møguliga atkomu til økið. Sí skjal nr. *25/03549-4, Uppskot til atkomuveg*, har tvær vegaloysnir verða vístar. Umsitingin mælti til vegaloysn A umvegis bæði matr. nr. 159 og 80a. Eigararnir av matr. nr. 159 og 80a vóru hvørki glaðir fyri loysn A ella B, men vístu á møguleikan, at vegurin varð fluttur út til ánna á matr. nr. 107a.
Víst verður til mál nr. *25/05672 Keyp av lendi til veg til ætlaða útstykking við Sjógv í Kollafirði - matr. nr. 158, 80b, 159, 80a og 80c, Kollafirði*, har fundir hava verið við eigararnar um atkomuviðurskiftini.

Síðani fundir við eigararnar áðrenn summarferiuna, hevur málið ligið stilt, og fyri at koma víðari við eini loysn, varð málið um vegaloysn lagt fyri ferðslunevndina, sí mál nr. *25/06681 Atkomuvegur til útstykkingina við Sjógv á matr. nr. 313a, Kollafjørður.*
Ferðslunevndin er samd um, at allir tríggir møguleikar kunnu nýtast, men at loysn A gjøgnum matr.nr. 80c, Kollafirði, er ferðsluliga best hóskandi.
So statt verður málið lagt fyri Byggi- og býarskipanarnevndina og Teknisku nevnd til endaliga støðutakan um atkomuvegin til matr. nr. 313a, Kollafirði.

Tá endalig avgerð fyriliggur viðv. atkomuvegnum, verður neyðugt at fáa viðurskiftini formliga upp á pláss, og helst skal vegurin somuleiðis gerast. Tá hetta er avklárað er klárt at fara undir útbjóðing av lendinum til bústaðarbygging.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*25/05672 Keyp av lendi til veg til ætlaða útstykking við Sjógv í Kollafirði - matr. nr. 158, 80b, 159, 80a og 80c, Kollafirði*
*25/06681 Atkomuvegur til útstykkingina við Sjógv á matr. nr. 313a, Kollafjørður*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**
*25/03549-2, Upprunalig málslýsing_mál nr. 23/02421_Framtíðar byggilendi í Kollafirði*
*25/03549-4, Uppskot til atkomuveg*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Enn eru fíggjarligu avleiðingarnar av hesum málinum ikki kendar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at staðfesta vegaloysn A sum atkomuveg til matr. nr. 313a, og at heimila umsitingini at fara undir formligu viðurskiftini fyri at fáa vegaloysnina avgreidda við avvarðandi partar,
Og tá atkomuviðurskiftini eru avgreidd:

- at skipanin av økinum verður boðin út til ráðgeva at koma við boð upp á eina alternativa bústaðarbygging í økinum, og at skipanin hereftir verður boðin út til arbeiðstakara at gjøgnumføra.
- at endalig avtala við festaran um seyðahúsið verður avgreidd.
- at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. november 2025:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, treytað av at hetta verður boðið út alment.

Kári Johansen, tekur undir við tilmælinum, treytað av at hetta verður boðið út í kommununi.

Bergur Robert Dam Jensen tekur undir við tilmælinum, treytað av at viðurskifti í avtaluni við festaran fáa fyrstu raðfesting.

**Tekniska nevnd 03. november 2025:** Anja Weyhe tekur undir við tilmælinum.

Bergur Robert Dam Jensen tekur undir við tilmælinum, treytað av at viðurskifti í avtaluni við festaran fáa fyrstu raðfesting.

Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum, treytað av at hetta verður boðið út til arbeiðstakarar í Tórshavnar kommunu.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. november 2025:**
Annfinn Brekkstein skjeyt upp at beina málið aftur í nevnd. Tað varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, ongum atkvøðum ímóti og ongum blonkum atkvøðum.

**Atkvøddu fyri:** Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Guttorm í Skála, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen, Annfinn Brekkstein og Kári Johansen.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í allari viðgerðini av málinum.

Bergur Robert Dam Jensen luttók ikki í viðgerðini.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:50**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Heidi Lava Elgeirsdóttir |
| Annita á Fríðriksmørk | Anja Weyhe | Kristianna Winther Poulsen |
| Bergur Robert Dam Jensen | Guttormur í Skála | Annfinn Brekkstein |
| Tróndur Sigurðsson | Kári Johansen | Høgni Vilhelmsen |
| | Birgir Nielsen | |